

# FRØÐI

1 / 2013 18. ÁRG. KR. 48,-

Tað SKAL vera stuttligt at læra…

Landgrunnurin uttan fyri 200 fjórðingar – løgfrøðilig og jarðfrøðilig atlit

Vangamynd: Samstarv fær Fróðskaparsetrið at vaksa

Vistspeki – Arne Næss gav fossum og landsløgum tign

Granskarasetrið – Avbjóðing at skapa samband millum vinnuligu og almennu granskingina

Setursdagur – framløgur av granskingarætlanum

## Lívsins loyndarmál – um Dr. Watson og Double Helix

9 771395 004003

# At kunna um gransking og vísindi

Lættvísindatíðarritið Frøði hevur nú 20 ár á baki, og síðan 1993 eru komin 30 rit. Við Frøði vilja vit leggja doyðin á at miðla og kunna eina umboðandi breidd av føroyskum vísindavirksemi.

Í hesum blaðnum taka vit til viðgerðar sera ymiskar, men týdningarmiklar tættir innan føroyskt vísindavirksemi. Vit eru væl við á hægstu rókum innan gransking í framtíðar heilsubótararbeiði, um vit vilja tað ella ikki. Í heyst verður skipað fyri altjóða ráðstevnu innan ílegur, FarGen Summit, har eingin mætari enn Dr. James D. Watson sjálvur verður ein av høvuðsrøðarunum. Bogi Eliasen, verkætlanarleiðari hjá FarGen, lýsir tann nú 85 ára gamla heimsgitna vísindamannin sum ein bersøgnan, nýskapandi og ótolnan mann, sum fer beina kós eftir málinum. Watson fekk saman við Francis Crick og Maurice Wilkins í 1962 Nobelvirðislønina í læknavísindum fyri sítt drúgva arbeiði á íleguøkinum.

Gransking í útbúgving fer fram á Námsvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum. Har er gjørd kanning millum føroyskar skúlanæmingar, sum m.a. avdúkar, at tað skal vera stuttligt at læra, annars kemur ikki nóg væl burtur úr læringini. Kanningin, sum Erla Olsen og Firouz Gaini, granskarar, hava staðið fyri, vísir eisini, at genturnar sum heild hava betri hug at ganga í skúla enn dreingir, meðan dreingirnir í størri mun enn genturnar, halda, at undirvísingin í skúlanum er góð.

Síðani kemur grein eftir Bjørn Kunoy doktara í løgfrøði, og Martin Heinesen jarðfrøðing og lim í landgrunsnevnd Sameindu Tjóða. Greinin snýr seg um landgrunsviðurskifti Føroya á økjum uttan fyri 200 fjórðingamarkið. Greinin er tvørfaklig og tvinnar saman tvær so ymiskar frøðigreinar sum løgfrøði og jarðfrøði, og gevur gott innlit í tey viðurskifti, sum kunnu sigast at vera grundarlagið undir teimum rættarkrøvum, sum Føroyar seta, tá ið talan er um at verja rættin til landgrunn uttan fyri 200 fjórðingar. Somuleiðis verða rættvísismát og ymisk mannagongdaratlit útgreinað í sambandi við økir, har fleiri lond kunnu hava javnbjóðis landgrunsrættindi.

Vit vildu eisini vísa eina vangamynd av okkara størsta frøðistovni, sum bæði tekur sær av fjølbroyttari gransking og undirvísing, nevniliga Fróðskaparsetri Føroya. Setrið er seinastu árini farið ígjøgnum umfatandi bygnaðarbroytingar og er mitt í tilgongdini at laga seg til henda nýggja bygnað. Helgi Jacobsen høvundur hevur hitt Sigurð í Jákupsstovu, rektara á Fróðskaparsetrinum, sum greiðir okkum frá teimum visjónum, sum stovnurin hevur sett sær fyri ta komandi tíðina. Ein hugvekjandi samrøða, sum lýsir støðuna í dag og tær broytingar, sum vit kunnu vænta okkum innan hægri útbúgving og gransking tey næstu árini.

Heimspeki er ikki væl grundað í føroysku frøðitilvitskuni, hóast vit hava fleiri heimspekingar í Føroyum, bæði lærdar og leikar. Jógvan D. Hansen heimspekingur hugleiðir um norska heimspekingin Arne Næss, ið andaðist í 2009, næstan 97 ára gamal, og sum gjørdist talsmaður fyri ta „djúptøknu" vistfrøðiligu rørsluna. Í greinini vísir Jógvan D. Hansen á, hvussu Arne Næss setti mark millum tær „grunnu" umhvørvisrørslurnar og ta „djúptøknu" vistfrøðina. Viðkomandi lesnaður, nú vit støðugt verða noydd at vísa náttúruatlit.

Vit hava júst fingið okkara fyrsta granskarasetur, sum skal hýsa bæði almennum og privatum granskingarverkætlanum, og sum hevur sum mál at hevja granskingina í Føroyum. Vit hava hitt Jógvan Jespersen, formann í iNOVA, sum er rakstrarfelagið hjá Granskarasetrinum.

*Góðan lestrarhug*


FRØÐI
1 / 2013

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

**FØROYA FRÓÐSKAPARFELAG GEVUR FRØÐI ÚT**


© Føroya Fróðskaparfelag og høvundarnir.


Frøði er fólksligt vísindablað, sum kemur út tvær ferðir árliga.

Upplag 1.300
ISSN 1395-0045


*Loyvt er at endurgeva út Frøði, um víst verður til heimildina. Verða heilar greinir endurgivnar, má avtala gerast.*


**AVGREIÐSLA**
Jarðfeingi, Brekkutún 1
Postsmoga 3059
FO-110 Tórshavn
Tlf. 357000
teldupostur: frodi@jf.fo

**RITSTUÐLAR**
Fróðskaparsetur Føroya
Søvn Landsins
Havstovan
Heilsufrøðiliga Starvsstovan
Jarðfeingi
Umhvørvisstovan

**NÝGGIR HALDARAR**
kunnu tekna seg hjá avgreiðsluni.

**ELDRI ÚTGÁVUR AV FRØÐI**
fáast við at venda sær til avgreiðsluna.

**GREINIR TIL BLAÐIÐ**
Fólksligar, vísindaligar greinir kunnu sendast ritstjórnini. Skrivlig høvundaleiðbeining fæst frá avgreiðsluni.

**LÝSINGAR TIL FRØÐI**
Er áhugi fyri at lýsa í blaðnum, setið tykkum tá í samband við avgreiðsluna,
telefon 357000
fax 357001
teldupostur: frodi@jf.fo

**LÝSINGARPRÍSUR**
Heil síða: kr. 5.000,-
Hálv síða: kr. 3.000,-

**RITUMBOÐSRÁÐIÐ**
Símun V. Arge, fornfrøðingur
Anna Maria Fosaa, plantuvistfrøðingur
Sámal T.F. Johansen, søgufrøðingur
Elin Súsanna Jacobsen, søgufrøðingur
Maria Dam, evnafrøðingur
Gunnar Bjarnason, búnaðarfrøðingur
Eilif Gaard, havlívfrøðingur
Lis Mortensen, náttúrulandafrøðingur

**GRAFISK FRAMLEIÐSLA OG PRENT:** Føroyaprent

**SAMSKIPARI**
Helgi Jacobsen

**RITSTJÓRN**
John Dalsgarð (ábyrgd)
Hans Ellefsen
Jóannis Danielsen
Erika Hayfield
Vár í Ólavstovu

**FRÓÐSKAPARFELAG FØROYA**
Heimasíða: www.frodskaparfelagid.fo
Limagjald: 300 krónur um árið, at gjalda á konto í Eik Banka 9181-495.171.0
SWIFT code: EIKBFOTF,
Iban-no: F056 9181 0004 9517 19
Minnist til at viðmerkja navn.




4



30



10




14

# Innihald


4 LÍVSINS LOYNDARMÁL – UM DR. WATSON OG DOUBLE HELIX
Bogi Eliasen verkætlanarleiðari FarGen

10 TAÐ SKAL VERA STUTTLIGT AT LÆRA…
Erla Olsen

14 LANDGRUNNURIN UTTAN FYRI 200 FJÓRÐINGAR – LØGFRØÐILIG OG JARÐFRØÐILIG ATLIT
Bjørn Kunoy, doktari í løgfrøði og Martin V. Heinesen, jarðfrøðingur

24 VANGAMYND: SAMSTARV FÆR FRÓÐSKAPARSETRIÐ AT VAKSA
Helgi Jacobsen

30 VISTSPEKI – ARNE NÆSS GAV FOSSUM OG LANDSLØGUM TIGN
Jógvan D. Hansen, heimspekingur

34 AVBJÓÐING AT SKAPA SAMBAND MILLUM VINNULIGU OG ALMENNU GRANSKINGINA
Granskarasetrið

# Lívsins loyndarmál
## – um Dr. Watson og Double Helix

Seinni í ár kemur heimskendi ílegugranskarin Dr. James Watson á vitjan í Føroyum. Hann skal taka lut á FarGen ráðstevnuni, sum verður í døgunum 19.-20. september. James Watson var ein teirra sum fann fram til skapið á DNA-num. Hetta var í 1953, og er kanska týdningarmesta lívfrøðiliga frambrotið í 20. øld. Watson sær stórar møguleikar í FarGen-verkætlanini í Føroyum.



**Bogi Eliasen**
verkætlanarleiðari FarGen

**Genomlisin**
Watson var annar av fyrstu persónum, sum fekk allan arvastrongin lisnan. Tað var Baylor College í Houston, sum stóð fyri hesum. James Lupski, sum hevur verið fleiri ferðir í Føroyum og er partur Scientific Advisory Board hjá FarGen, tulkaði genomið fyri Watson.

Í september 2008 leitaði eg mær til Cold Spring Harbor Laboratories skamt uttanfyri New York, á ráðstevnu, nevnd Personal Genomes, har spurningurin at fáa lýstan allan arvastreingin hjá tí einstaka menniskjanum var høvuðsevni.

Human Genome Project kom á mál í 2003 við at kortleggja allan arvastrongin hjá menniskjanum og í 2007 blivu James Watson sjálvur og Craig Venter, sum fyrstu einstaklingar, ílegulisnir, og dyrnar til at lesa allan arvastrongin hjá einstaklingum stóðu nú opnar.

Ráðstevnan, eg hevði leitað mær á, var tí sera væl vitjað av høgt mettum granskarum kring heimin. Ein teirra var Dr. James Watson, sum saman við øðrum lýsti og almannakunngjørdi bygnaðin á DNA-num í 1953.

### Ílegur og stjórnarmál

Ofta havi eg, bæði úti og heima, fingið spurningin, hví ein stjórnmálafrøðingur er farin í holt við ílegur? Bakgrundin er, at áhugin fyri ílegum, sum í fleiri ár hevði verið eyðsýndur í Føroyum, saman við teirri skipan, sum var bygd upp við Ílegusavninum, og tað, at kona mín, Gisela, næm sær útbúgving sum ílegufrøðingur, vakti mín áhuga fyri hesum øki. Mín fakliga styrki hevur ongantíð verið og fer ongantíð at vera tað genetiska. Ístaðin havi eg førleikar í samfelagsskipanum og samspælinum millum innlendis og altjóða politikk, bygnaðir og lógarverk.

Eg undraðist ofta á, hví vit í Føroyum ikki vóru komin longur á hesum øki. Serliga hugsaði eg um tørvin á at fáa sett íleguvitan og ílegugransking í



Dr. James Watson er føddur 6. apríl í 1928 í Chicago. Longu í 1953 vann hann sær sæti í heimssøguni, tá hann saman við Francis Crick almannakunngjørdi skapið á DNA-num. Í heyst kemur hann á ráðstevnu í Føroyum.



Pál Weihe, leiðari fyri FarGen, við einum modelli av Double Helix

eitt samfelagsligt høpi, so at hetta kundi vera við til at tæna borgaranum best møguligt. Í fyrsta umfarið sá eg hetta sum eina uppgávu, har eg var við til at gera vart við henda áhugaverda og sjálvsagda møguleika í Føroyum. Seinni hava vit sæð, at talan er um ein alheims tørv, sum so eisini er ein av orsøkunum til, at so stórur áhugi hevur verið vístur FarGen-verkætlanini uttan fyri Føroyar.

Í 2008 var eg knýttur at Bitland, sum nøkur ár frammanundan hevði gjørt eina kanning um arbeiði við ílegum. Men áhugi var fyri at gera meira, og eftir væleydnaða túrin á Cold Spring Harbor varð ein verkætlan sett upp við stuðli frá Sagex, Samvit, Landsjúkrahúsinum, Fróðskaparsetrinum og Vinnumálaráðnum, har Sigurð Vang fyri Ílegusavnið og Pál Weihe fyri Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu vóru við. Hesir báðir eiga stóran lut í tí arbeiði, sum er gjørt fyri at skipa ílegugransking í Føroyum.

Eg hevði tá í eitt tíðarskeið verið í samskifti við serliga Pál og Sigurð um møguleikar at lyfta ílegugransking longur fram á leið í Føroyum.

### Hitti James D. Watson

Í 2008 gjørdi eg vikuliga sjálvur annar útvarpsendingina Úthav, og tá kósin varð sett móti Cold Spring Harbor, hevði eg eisini gjørt av, at ein samrøða við James Watson mátti vera við í skjáttuni heimaftur. Eg fyrireikaði meg væl, og las m.a. fleiri av bókum hansara. Nakað frammanundan hevði kona mín verið á einum summarskeiði um skizofreni á Cold Spring Harbor. Har bar tað so á, at hon hitti sjálvan James Watson, sum av persónligum ávum hevði serstakan áhuga fyri skizofreni, tí annar sonur hansara, Rufus, hevur hesa sjúku. Tá tað ikki var so vanligt, at suðuramerikanarar (kona mín er úr Peru) vóru við á slíkum skeiðum, var hann sjálvandi áhugaður í at vita meira um hennara bakgrund og hví hon var har.

Tað var hurðin, sum var gloppað. Eg visti, at Watson fór at minnast suðuramerikanaran, sum arbeiddi við skizofreni og hevði tilknýti til Føroyar.

Á ferð míni í Cold Spring Harbor vísti tað seg tó at vera striltið at fáa orð á Watson. Eini 250 fólk vóru á ráðstevnuni, og flestu teirra vildu sleppa at



Greinskrivarin saman við James Watson høgrumegin og James Lupski vinstrumegin. Lupski er knýttur at FarGen í sonevnda Scientific Advisory Board. Lupski tulkaði arvastrongin hjá Watson í 2007.



Røntgenmyndir hjá Maurice Wilkins til vinstru og Rosalind Franklin til høgru av A og B forminum hjá DNA-num.

tosa við hann. Stutt framman undan hevði hann verið í andglettinum í sambandi við eina samrøðu í BBC og segði tí at kalla tvørt nei til at gera samrøður við fjølmiðlarnar. Tað eydnaðist mær tó at koma á tal við hann, og hann játtaði at tosa við meg í 10 minuttir. Ein tíma seinni var samrøðan liðug, og eg hevði fingið bæði eina góða samrøðu og ein masterclass í tí sum fór fram á íleguøkinum. Watson helt, at Føroyar vóru serstakliga áhugaverdar sum ein partur at menna íleguvitanina. Gróðrarbotnurin fyri sterku altjóða sambondunum, vit hava knýtt at FarGen verkætlanini, byggja í stóran mun á henda tíman saman við Dr. James Watson í Cold Spring Harbor í 2008.

## Watson og FarGen

Í 2011 fekk eg so tann heiður, at verða boðin at halda fyrilestur á hesi sterku Personal Genomes ráðstevnu í Cold Spring Harbor, har James Watson sat á fremsta rað, beint framman fyri mær, og har arbeiði okkara á fyrsta sinni varð lagt alment fram uttan fyri Føroyar. Samstundis stóð ein grein um FarGen verkætlanina í stóra bretska dagblaðnum The Times. Síðani tá hava javnan greinar verið at lisið í útlendskum bløðum og ritum um FarGen.

FarGen er ein framsøkin almenn føroysk verkætlan, sum ynskir at lesa arvastrongin hjá øllum føroyingum, sum vilja tað. Endamálið er at byggja upp eina skrá, sum skal vera sjálvt íleguinfrakervið til heilsugransking og heilsutænastu í Føroyum.

At kortleggja ílegurnar, saman við tí vitan, sum vit longu hava í heilsuverkinum og í ættarbandsskránni, letur upp fyri møguleikum, sum kunnu betra um viðgerðar- og fyribyrgingarmøguleikarnar í føroyska heilsuverkinum. Tað skal vera sjálvboðið at verða ílegulisin, og øll skulu verða spurd og geva sítt samtykki fyrst.

## Menning av íleguvitan

Lívfrøðiliga vitanin mentist nógv upp gjøgnum alla 20. øld við alsamt betri háttum at eygleiða og skráseta. Eisini kann sigast, at lívføðin hesa seinastu øldina er farin frá at vera eygleiðandi vísindi til at fevna um verkætlanir og arbeiði við stórum og fjøltáttaðum, kvantitativum upplýsingum og skipanum.

Serstakliga ber íleguvitanin – genetikkin – brá av hesum. Frá eygleiðingum Mendels av einfaldari arvagongd, til at vit í dag hava risateldur, sum rokna sannlíkindi av ymiskum slag, bygd á lívfrøðiligar frymlar, har til ber at lesa allan arvastrongin, sum hjá menniskjanum er meira enn 3 milliardir basupør.

## Skriving – Honest Jim

James Watson er meira enn Double Helix, hóast tað uttan iva er tann hendingin, sum hevur havt størstan týdning, umframt at bók hansara „Double Helix *A Personal Account of the Discovery of the Structure of DNA*" frá 1968 eisini bleiv ein varði á sín serstaka hátt. Watson skrivaði bókina um kringumstøðurnar við arbeiðinum at finna DNA. Nógvastaðni var hann sera bersøgin, og tað var ikki vanligt, at vísindafólk eisini greiddu frá um tað ringa og søgdu sína meining um onnur vísindafólk. Bókin gjørdist ein bestseljari, men ikki uttan knoss. Watson ætlaði, at bókin skuldi eita „Honest Jim – A descritpion of a very great discovery", júst tí at hann er „very honest". Men Harvard University Press tók aftur sína tilsøgn um at geva bókina út, tá m.a. Francis Crick og Maurice Wilkins mótmæltu. Hon bleiv givin út á øðrum forlagi, og verður millum annað vird fyri tað persónliga innlit, hon gevur í vísindaligt arbeiði.

Við bókin við *Molecular Biology of the Gene* í 1965, setti Watson nýtt støði fyri lærubókaskriving til universitetini. Bókin er bert eitt av mongum dømum um frálærubøkur, hann hevur verið við til at skriva. Tað serliga við hansara leisti var at hann skrivaði beinleiðis til lesaran. Hann brúkti nógvar illustratiónir og gjørdi bókina lesaravinarliga við nógvum yvirskriftum og breiðari margu. Miðling, vit í dag meta sum sjálvfylgja, men sum tá var nýbrot. Eisini var hetta fyrsta beinleiðis bókin skrivað við útgangsstøði í molekylærbiologi og ílegum og varpaði hon, umframt formin, ein nýggjan hugsunarhátt.

## Á universitet sum 15 ára gamal

Watson skrivar sjálvur, at hann sum ungur kanska var meira hugaður at lesa bøkur enn at hyggja at konufólki. Tað var serliga pápin, sum vakti áhuga hansara fyri náttúruni og ikki minst fuglalívinum við teirra longu gongutúrum. At tað lá væl fyri at læra er lítið at ivast í, tí bert 15 ára gamal fekk Watson undantaksloyvi at byrja at lesa á University of Chicago, har hann tók bachelor í zoologi. Haðani fór hann á Indiana University at lesa, har longu nógv varð granskað í mýllívfrøði og ílegum. Ph.d.-ritgerðina gjørdi hann í rannsóknarstovuni hjá Nobelheiðurslønarvinnaranum Salvador Luria, ið var ein av undangongumonnunum í sonevndu Phage Group, og sum arbeiddi við virus í bakterium og legði nógva orku í at finna skapið á DNA-num. Longu sum 22 ára gamal í 1950 vardi Watson sítt ph.d.-heiti.

## Keypmannahavn

Watson byrjaði sína postdoc yrkisleið í 1950 í Keypmannahavn undir leiðslu av Herman Kalckar. Watson visti, at gátan um DNA-ið skuldi loysast evnafrøðiliga, og her helt hann sjálvur, at hann var ov illa ílatin. Tí tók hann ímóti einum postdoktorati hjá lívevnafrøðinginum Herman Kalcar, sum eygleiddi, hvønn týdning tey smáu mýlini høvdu, sum tilsamans gjørdu DNA-ið. Watson sá skjótt, at hetta fór ikki leiða hann nærri at einari loysn á gátuni um sjálvan arvastreingin. Meðan Watson enn var í starvi í Keypmannahavn, legði hann leiðina suður til Napoli at vera við á eini lítlari ráðstevnu um hvussu røntgengeisling kundi vera við at avdúka skapið á mýlum. Har fekk Watson kunnleika til arbeiðið hjá Maurice Wilkins, sum síðan skuldi vísa seg at vera ein umráðandi liður í arbeiðinum hjá Watson og Crick at finna fram til skapið á DNA-num. Aftan á eitt ár í Keypmannahavn eydnaðist tað Watson, umvegis sítt góða netverk, at fáa eitt postdoctorat í Cambridge í Onglandi.

## Cambridge

Cambridge var tá sum í dag eitt eldorado fyri framsókna vitan, og har var eitt spírandi umhvørvi, sum higar til hevur verið við til at vunnið nógvar nobelheiðurslønir. Og júst umhvørvið og tað tvørfakliga í sambandi við hesa stóru uppdaging, sum tað var



Watson og Crick funnu skapið á DNA-num.

**Double Helix og Dr. Watson**

Úrmælingurin Dr. James Watson er ein teirra, sum hevur verið við í stórum parti av hesi menning. Hann er føddur 6. apríl í 1928 í Chicago, og longu í apríl 1953 vann hann sær sæti í heimssøguni, tá hann saman við Francis Crick almannakunngjørdi skapið á DNA-num. Hann var tá bert 25 ára gamal. Góð níggju ár seinni, í 1962, fekk hann saman við Francis Crick og Maurice Wilkins heiðursløn Nobels, ikki fyri at finna skapið á DNA-num, men fyri teirra drúgvu ílegugransking. Eftirtíðin hevur hildið, at Rosalind Franklin, sum átti røntgenmyndirnar og sum váttaði tesina hjá Watson og Crick, helst eisini hevði fingið lut í hesi heiðursløn, um hon var á lívi. Hon doyði av krabbameini í apríl 1958, bert 37 ára gomul.

Watson var sostatt ikki meira enn ein ársungi, tá ið hann saman við Crick fann fram til skapið á DNA-num, sum fekk heiti Double Helix, tí tað í bygnaði hevði skap av einum dupultum snyrli. Tí kann hann nú, 85 ára gamal, men „still going strong", hátíðarhalda hesi 60 árini síðan slóðbrótandi uppdagingina.



Við Double Helix verður sipað til serliga skapið á DNA, sum er tveir javnsettir og samanbundnir streingir, ið minna um eina snúningstrappu. Streingirnir eru bundnir saman á hvørjum trini. Hesar bindingar eru millum tvær av fýra evnafrøðiligu basunum *guanine*(G), *adenine*(A), *thymine*(T), og *cytosine*(C), sum tað sæst á myndini.



**FarGen toymið og FarGen**
Í sambandi við FarGen er eitt toymið sett at arbeiða við verkætlanini. Í toyminum eru Pál Weihe, leiðari, Bogi Eliasen, verkætlanarleiðari, Maria Skaalum Petersen, ph.d. og Jónrit Halling, ph.d. (myndin). Maria og Jónrit hava báðar granskingarroyndir í føroysku skipanini.

Uppgávan hjá FarGen toyminum er at menna langtíðarætlan at íleguIesa allar føroyingar, at byggja upp eina trygga skipan í Føroyum, at samstarva út í heim og at fígja verkætlanina.

Í stýrisbólkinum fyri FarGen eru aðalstjórarnir í Heilsumálaráðnum, Vinnumálaráðnum, Mentamálaráðnum og Fiskimálaráðnum.

Harumframt hevur FarGen eitt Scientific Advisory Board (SAB) knýtt at sær, sum veitir FarGen vísindaliga ráðgeving.

at finna skapið á DNA-num, átti helst sín stóra lut í hesi tilgongd.

## Double Helix

At finna „Double Helix“ var ikki eitt einstaklingsavrik. Her var talan um gransking, sum byggir á bæði undanfarna gransking og samtíðargransking, umframt at tað her snýr seg um at menna og økja tað innlit, sum sprettur úr sonnum granskingarumhvørvi og netverki millum granskarar.

Nógv hevur verið tosað um, hvussu stóran part, James Watson og Francis Crick áttu í sjálvari uppdagingini av DNA-num, m.a tí at henda uppdaging í stóran mun byggir á røntgenmyndir hjá bretska evnafrøðinginum Rosalind Fraklin, umframt arbeiðið hjá bretska alisfrøðinginum Maurice Wilkins, sum bæði vóru knýtt at King's College í London, og sum bæði verða nevnd í teirri fyrstu greinini, sum Watson og Crick lótu prenta í Nature. Hesi vóru heldur ikki teir einastu granskararnir, sum royndu at finna fram til skapið á DNA. Talan var um eina av tíðarinnar mest framkomnu uppgávum, tí vitanin um DNA var til staðar. Granskarar vistu, at tað *var* har, men ikki, hvussu tað sá út, og heldur ikki, hvussu tað virkaði. Tað er í hesum høpi, vit skulu skilja braneggjaðu orðini: „We have discovered the secret of life“. Lítil ivi er um, at Watson heilhjartað hevði sett sær fyri at fáa loyst gátuna viðvíkjandi DNA-num, fyrr heldur enn seinni, og tí vistu hann og Crick, hvat tað var, teir sóu, tá ið teir hugdu eftir røntgenmyndunum hjá Rosalind Franklin.

## Harvard & Cold Spring Harbor

Í 1956 byrjaði Watson á Harvard har hann var fram til 1976. Hann hevði eina góða yrkisleið á Harvard, har hann arbeiddi seg skjótt uppeftir.

Í 1968, meðan Watson framvegis var í starvi á Harvard, gjørdist hann eisini stjóri fyri Cold Spring Harbor Laboratories. Cold Spring Harbor var eitt kent granskarasetur, sum hevði arbeitt við genetikki síðani fyrst í øldini, men Cold Spring Harbor var í fíggjarligum vandasjógvi. Undir leiðslu av Watson varð Cold Spring Harbor Laboratories ment til at vera eitt tað sterkaska vísindaumhvørvi í heiminum, sum í stóran mun hevur verið grundarlagið undir tí íleguvitan, vit hava um krabbamein í dag. Eisini er Cold Spring Harbor nú sera væl fyri fíggjarliga, eins og tað er ein miðdepil fyri skeið og ráðstevnur á íleguøkinum á hægsta altjóða stigi.

## Tilgongdin fram til Human Genome Project

Watson var ein av oddamonnunum at fáa Human Genome Project í gongd, og hann var eisini fyrsti stjórin fyri verkætlanini – settur í 1990. Men longu í 1992 segði hann starvið frá sær, tí hann kundi ikki taka undir við almennu amerikonsku ætlanini um at patentera ílegusekvensar. HGP kom á mál í 2003 eftir trettan ára arbeiði. Upprunaliga var tað Department of Energy (DoE) í USA, sum tók stig til verkætlanina, og tað var í samstarvi við National Institute of Health (NIH), at gongd var sett á. Seinni tóku serliga bretski filantropiski grunnurin Welcome Trust eins og granskingareindir í Týsklandi, Japan, Fraklandi og Kina sær størri part av uppgávunum í samband við verkætlanina.

## ELSI

Í 1988 gjørdist Watson varugur við, at nógv settu spurnartekin við, um tað var etiskt rætt at fara undir umfatandi ílegugransking. Watson tók tí stig til sonevnda ELSI-hugtakið (Ethical, Legal & Social Issue). Tá ið Human Genome Project síðani kom í gongd, varð tilskilað, at minst 5% av játtanini skuldu brúkast til ELSI-økið. Á tann hátt var tað Watson sjálvur, sum tók stig til at fáa skipaða gransking á hesum økjum.

## Watson og sjúka

Tað er ikki heilt av tilvild at Watson veit um Føroyar. Annar sonur hansara er sjúkur av skizofreni, og Føroyar hava leingi verið kendar í vísindaheiminum fyri genetiska gransking í sambandi við skizofreni. Watson sjálvur hevur ein serligan áhuga í hesi sjúku, umframt at finna fram til orsøk og møguliga leking og /ella fyribyrging av henni.



# Watson og FarGen



James Watson hevur víst FarGen visjónini ans síðan vit hittust á fyrsta sinni í 2008, og við sínum víðfevnda innlitið í gransking og menning á íleguøkinum, hevur hann eisini verið ein íblástur hjá mongum, sum arbeiða fyri at gera íleguvitan til ein sjálvsagdan tátt í heilsuverkum.

Tað hevur týdning at tað í ár eru 60 ár liðin síðan Double Helix var uppdagað. Tað hevur eisini týdning, at tað eru 10 ár liðin síðan Human Genome Project kom á mál. Talan er um megnaravrik, sum hava stóran heiður uppibornan. Tað fyrsta er eitt dømi um vísindaligt nærlagni og eina neyvt skipaða leitan eftir vitan, sum kundi greiða tað ógreidda. Í øðrum lagi snýr tað seg um eina tilgongd, sum krevur eitt umhvørvi og persónar við ymsum førleikum og áskoðanum fyri at koma fram til hesa nýggju vitan.

Human Genome Project er dømi um eitt sera breitt samstarv, har toymið við James Watson á odda megnaði at fáa eina fígging, hvørs upphædd er somikið stór, at tað at kalla bara er hernaðarmenning, sum fær líknandi upphædd í USA.

Watson var talsmaður fyri, at øll vitanin skuldu savnast og vera atkomulig og hann var hart ímóti, at privatar fyritøkur skuldu kunna taka patent uppá íleguurnar, sum dømi vóru frá Myriad Genomics og BRACA. Hann var so nógv ímóti hesum, at hann at enda fór frá sum stjóri fyri Human Genome Project.

Watson er kontroversiellur. Hann er bæði „Honest Jim“ og sera bersøgin. Men eftir hann standa varðar, sum hava havt alstóran týdning seinasta 60-áraskeiðið: Skapið av DNA, nýggi leisturin til lærubøkur, menningin av einum tí sterkasta vísindasetrinum í heiminum og stóri ognarluturin at fáa gongd á Human Genome Project. Fyri at seta fýra so kraftmiklar varðar eftir seg er kanska neyðugt at verða bersøgin. „Honest Jim“ hevur royndir og eina søgu, vit øll kunnu læra av – umframt at hann enn sum 85 ára gamal gevur sítt boð uppá framtíðina.

## Watson á FarGen Summit

Tað hevur stóran týdning at fáa úrmælingar sum James Watson við á FarGen Summit ráðstevnuna í Føroyum. Tað er eitt greitt tekin um, at granskaraheimurin sær FarGen sum eina sera spennandi og týdningarmikla verkætlan, bæði í granskingarhøpi, men ikki minni í heilsuligum og samfelagsligum høpi.

Um vit vilja vera frammarlaga her, er alneyðugt at hava samstarv við fremstu granskararnar. Ráðstevnan borðreiðir við fleiri granskarum, sum hava havt týdningarmiklan part í at skapa og seta í verk Human Genome Project. Tað er tí av alstórum týdningi, at FarGen verður fatað sum ein partur av teirri menning av íleguvitan, sum er farin fram tey seinastu 60 árini og sum fer at verða í framtíðini.

# Tað SKAL vera stuttligt at læra…



**Erla Olsen**
Úrslitini í hesi grein eru partur av framløgu, sum Erla Olsen og Firouz Gaini hildu á ráðstevnu hjá NERA, norðurlendska felagsskapinum fyri gransking í útbúgving, í mars mánaði.

Eg havi eitt minni frá míni egnu skúlatíð. Eg var til próvtøku í søgu, og kom upp í einum broti um kríggið í Abessinia. Roknað varð við, at eg skuldi greiða frá, hvussu bardagin fór fram, umframt at eg skuldi siga nakað um, hvønn týdning hetta kríggj hevði fyri annan veraldarbardaga.

Eg hevði ongantíð áður hoyrt um hetta kríggj, og hevði onga hóming av, hvat og hvar Abessinia var. Undir próvtøkuni skilti eg, at tey væntaðu at eg greiddi frá, hvussu hermótið flutti seg aftur og fram undir bardøgunum, hvussu stórt mannfallið var, umframt hví hetta var ein avgerandi hending fyri annan veraldarbardaga. Eg hevði als ongan áhuga í hesum, og havi ongantíð síðan havt áneyðir at kanna hesi viðurskifti heldur.

Síðan eg eri farin undir at arbeiða við undirvísing og læring havi eg hugsað um hesa hending sum eitt dømi um eina støðu, har einki var lært. Sjálvandi hevði evnið verið frammi í skúlaárinum, annars høvdu vit ikki havt tað til próvtøkuna, men eg hevði einki fingið við, hvørki í vanligu tímunum, ella tá ið vit fyrireikaðu okkum til próvtøku. Í mínum hugaheimi var Abessinia ikki til – og hvaðna minni var nakað týðandi farið fram í Abessinia!



Dømið oman fyri vísir á fleiri viðurskifti viðvíkjandi læring, eitt nú, at tá ið læring skal fara fram, er neyðugt at byggja á okkurt, sum næmingurin veit frammanundan. Er tað nýggja ov nógv í andsøgn við tað, sum næmingurin kennir til, er vandi fyri, at næmingurin vísir nýggju vitanina frá sær.

Fleiri orsøkir kunnu vera til, at ongin læring fer fram, í mínum dømi oman fyri er tað kanska tað, at kríggj, herstjórar og hermót hoyra til ein mannfólkaheim, sum gentur hava ilt við at fata og koma til sættis við. Ein onnur atvold kann vera, at í mínum hugaheimi – sum 12 ára gomul – var sera langt aftur til annan veraldarbardaga. Ein drongur, sum vaks upp undir krígnum, og kanska var 12 ár í 1945, var í 1972 eini 37 ára gamal. Hjá honum var annar veraldarbardagi sera viðkomandi, og hann visti helst, at einaferð var danska heitið á Etiopia Abessinia.

Mín søgubók var skrivað til tey vaksnu, men hon var ætlað okkum í 6. flokki. Tað var ikki viðkomandi, og tað var ikki stuttligt.

## Ein 100 ára gamal trupulleiki

Nógv er skrivað um tað at læra, og nógv av tí gamla vísdóminum er framvegis galdandi. Til dømis skrivaði John Dewey í 1916 *[1]* um eina stirvna skúlaskipan, sum í stóran mun var ein avleiðing av tí gamla bóndasamfelagnum, tá ein stórur partur av barnalærdóminum fór fram við at børnini vórðu tikin við í dagliga arbeiðið. Har høvdu børnini møguleikar at forvitnast, at kanna, spæla, røra seg og eygleiða. Hesi børn tuskaðu allan dagin, men skuldu í skúla at læra bókligan førleika. Trupulleikin var sambært Dewey, at samfelagið hevði broytt seg frá einum bóndasamfelag til eitt ídnaðarsamfelag, og børnini høvdu tí ikki longur líka góðan møguleika at kanna og granska saman við familjuni. Tí var neyðugt at skúlin lagaði seg til hesar nýggju umstøður, og skipaði fyri rørslu og spæli, so at tað bleiv stuttligt at ganga í skúla, til frama fyri bæði læring, kropp og sinnalag.

Hann brúkti urtagarðsyrkið sum dømi um, hvat skúlin kundi gera. Tað er ikki neyðugt at læra urtagarðsyrki við tí endamáli at fyrireika tey til at arbeiða innan jarðarbrúk, ella fyri at fáa tíðina at ganga við onkrum, sum tey tíma at gera. Børn, sum í einum lærandi umhvørvi seta niður plantur, hava møguleika at kanna eina rúgvu av viðurskiftum kring planturnar, t.d. vøkstur, evnafrøði í mold, hvørja ávirkan ljósið hevur, hvat luft er og fuktur, og at kanna skaðilig og gagnlig djór og aðrar verur.

Ein annar sera góður máti at tryggja, at børnini hildu skúlagongdina vera stuttliga, meðan tey samstundis lærdu, var, sambært Dewey, at nýta listina sum amboð. Nú 100 ár eftir at Dewey skrivaði um, hvussu umráðandi list er fyri undirvísingina, kom tasmanski professarin Anne Bamford fyrr í ár til Føroya og segði okkum júst tað sama. Og niðurstøðan er nú, sum fyri 100 árum síðan, at rørsla og skapandi fak skulu inn í skúlan. Hesi skulu ikki

**Fjaðrarok og livradeymur:**
Við at brúka okkara náttúrutilfeingi í undirvísingini fæst høvi at nerta við nógv ymisk viðurskifti, bæði málslig, søgulig, mentanarlig, burðardygd, vinnulig og lívfrøðilig.




**Mynd 1.** Flestu næmingar halda, at tað gongur rímiliga væl í skúlanum, og eisini dámar teimum væl at læra. Tó halda genturnar tað vera stuttligari at ganga í skúla enn dreingirnir halda, og gentunum dámar eisini betur at læra. Sama er galdandi fyri skúlating, har gentur hava eitt sindur størri áhuga, meðan dreingir í størri mun bert gera tey skúlating, sum teir eru noyddir at gera.




**Mynd 2.** Sum heild dámar dreingjum undirvísingina betur enn gentum. Einans 6% halda undirvísingina vera sera góða, meðan 85% halda, at undirvísingin er góð ella miðal. Umleið sama mynstur sæst, tá ið næmingarnir verða bidnir um at meta um seg sjálvan (lítla myndin), har 15% halda, at tey eru sera góðir næmingar, meðan 72% halda seg vera góðar ella miðal næmingar.

bara vera undirvísingarevni í sjálvum sær, men skulu brúkast fyri at gera vanligu skúlafakini viðkomandi og stuttlig [2].

## Føroyski skúlin góður, men keðiligur

Flestu næmingar halda tað gongur væl í skúlanum, og teimum dámar væl at læra. Eisini halda tey, at undirvísingin í skúlanum er góð. Tað, sum tey ikki eru heilt sannførd um er, um tað er stuttligt at ganga í skúla. Rættiliga avgjørd eru tey tá ið tey verða spurd, um skúlating eru spennandi. – Tað eru tey ikki! Serliga dámar dreingjunum illa heimaarbeiði (Mynd 1). Hetta vísa nøkur av úrslitunum úr kanning av øllum næmingunum í 8. og 9. flokki, sum starvsfólk á námsvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum hava gjørt tað seinasta árið. Tilsamans 1222 næmingar svaraðu útvið 200 spurningum.

Viðgerðin av svarunum vísir, at tað er neyvt samband millum tað at dáma at læra, og tað at halda, at tað er stuttligt at ganga í skúla. Samstundis er eisini samband millum at halda tað er stuttligt at ganga í skúla, at halda, at skúlating eru spennandi, at tað gongur væl í skúlanum, og at halda, at undirvísingin sum heild er góð (Mynd 2).

## Flóð

Góð undirvísing fær næmingarnar at halda, at tað gongur væl í skúlanum, at skúlating eru (eitt lítið sindur) spennandi, at tað er stuttligt at ganga í skúla, og harvið kemur vælveran, sum ger, at teimum dámar at læra (Mynd 3).

At dáma at læra kann metast sum ein leitan eftir eini góðari kropsligari kenslu, sum kemur av kemiskum tilgongdum í heilanum[3]. Hjá teimum sum dámar at læra, síggja vit eina drívmegi og eina trongd at læra, á sama hátt sum tey, sum íðka ítrótt hava tørv á at røra seg.

Í 1975 kom Mihaly Csikszentmihalyi við hugtakinum flóð (flow). Hetta sipar til ta kensluna, sum fólk uppliva, tá ið tey gera okkurt, sum teimum dámar serliga væl. Tað kennist sum at verða borin burtur á eini aldu; sum at vera í einum floymi.

Csikszentmihalyi [4] heldur, at um lærarar brúktu bert ein lítlan part av orkuni at tryggja, at næmingarnar hava tað stuttligt meðan teir læra, ístaðin fyri at brúka alla orku uppá at royna at bera teimum kunning, fingust nógv betri úrslit. Øll læring verður bæði lættari og betri, tá ið næmingurin kennir nøgdsemi av læringini. Men syndarliga fáir næmingar kenna seg aftur í, at læring kann vera stuttlig, heldur Csikszentmihalyi.

Kanningin av føroyskum skúlanæmingum vísir,




**Mynd 3.** *Góð undirvísing byrjar eina góða ringrás sum ger, at næmingunum dámar at læra. Teir fáa ikki bara vitan burturúr, men eisini vælveru.*

at minni enn helvtin av teimum heldur, at tað er stuttligt at ganga í skúla, og at tað serliga eru dreingirnir, sum keða seg.

## Gentur góðtaka skúlan betur enn dreingir

Úrslitini, sum eru fingin til vega við hesi kanningini í 8. og 9. flokkunum eru sera lík teimum úrslitum frá kanning hjá Vár í Ólavstovu av næmingum í studentaskúlanum. Til dømis halda minni enn 5% av dreingjunum, men yvir 11% av gentunum í kanning hjá Vár í Ólavsstovu, at tey eru heilt væl fyrireikað til tímarnar í føroyskum í studentaskúlanum [5]. Samstundis sæst í kanningini hjá Vár í Ólavsstovu, at tann arbeiðsháttur, sum bæði dreingir og gentur halda vera tann besta í føroyskum, er interaktión millum lærara og næming, meðan teir ikki tíma serliga væl at hoyra læraran halda fyrilestur ella vanliga talvuundirvísing. Dreingjunum dámar illa at hoyra læraran halda langar fyrilestrar, serliga um tað er um óítøkilig fyribrigdi so sum at greiða og greina. Teir hava størri áhuga í til dømis søguligum viðurskiftum.

Skúlin í dag tykist ikki at hóska líka væl til dreingir sum til gentur. Orsøkirnar til hetta eru helst fleiri, men langtíðar avleiðingarnar eru, at tað eru munandi færri dreingir enn gentur, sum velja eina bókliga útbúgving. Munurin sæst longu í studentaskúlanum, har fleiri gentur ganga, og á stovnum við hægri útbúgvingum er í flestu førum fleiri lesandi konufólk enn mannfólk. Stutttíðar avleiðingarnar eru, at dreingirnir í størri mun enn genturnar halda, at skúlin er óviðkomandi, og tí at teir keða seg, órógva teir.

Seinastu 40-50 árini hevur verið arbeitt eftir tí ástøði, at tað er ikki annar munur á gentum og dreingjum enn tann, sum vit venja tey til. Gransking í læring hevur í stóran mun verið grundað á kanningar av, hvussu heilin arbeiðir, men innan læring hevur ikki verið serliga nógv fokuserað á munir á gentum og dreingjum [6].

Leonard Sax hevur granskað rættiliga nógv í kynsmunum innan skúlagátt, og hann hevur rættiliga víðgongd sjónarmið um, hvussu bæði kyn kunnu fáa sum mest burturúr skúlagongdini. Fyri tað fyrsta, so heldur hann, at dreingir skulu byrjað í skúlanum seinni enn gentur, tí teir eru ikki búnir til skúlan samstundis sum gentur. Eisini heldur hann, at tað hevði verið best, um kynini gingu í hvør sínum flokki, tí so bar til at laga undirvísingina til hvørt kynið. Leonard Sax vil vera við, at gentur hava lyndi at gera, sum lærari ella foreldur siga, meðan dreingir eru meira eksperimenterandi og kappingarhugaðir. Tað eru hesir eginleikar, sum skulu stimbrast fyri at fáa dreingirnar at lesa og læra [7].

## Kynstillagað undirvísing

Sum nevnt halda dreingirnir tað vera minni stuttligt enn genturnar at ganga í skúla, men staðfestast má, at einans triði hvør drongur, og minni enn onnur hvør genta er sera samd ella sindur samd í at tað er stuttligt at ganga í skúla. Sostatt høvdu bæði kyn havt gagn av, at skúlagongdin bleiv løgd soleiðis til rættis, at næmingarnir tíma betur at ganga í skúla. Eitt ítøkiligt dømi um slíka roynd er fótbóltsflokkurin í Tórshavnar kommunuskúla, har bara dreingir ganga.


1. Dewey, J., *Democracy and Education: an introduction to the philosophy of education*, 1916. p. 398.
2. Bamford, A., *List í uppvøkstri og skúlagongd í Føroyum*, 2012.
3. Illeris, K., *Towards a contemporary and comprehensive theory of learning*. International Journal of Lifelong Education, 2003. 22(4): p. 396-406.
4. Csikszentmihalyi, M. *Thoughts about education*. Creating the Future. Perspectives on Educational Change. 2002 [cited 2013 28/04]; Available from: http://education.jhu.edu/PD/newhorizons/future/creating_the_future/crfut_csikszent.cfm.
5. Ólavsstovu, V.í., *Mellem tradition og modernitet. Færøskfaget og den færøskfaglige kontekst i national diskurs. En diskursanalytisk redegørelse for fagets idé, praksis og reception i det almene gymnasium*, in *Humanistisk Fakultet*2011, Syddansk Universiet.
6. Carter, P. and M. Gurian, *Boys and girls learn differently!: A guide for teachers and parents*, 2001, Jossey-Bass.
7. Sax, L., *Boys Adrift: The five factors driving the growing epidemic of unmotivated boys and underachieving young men*, 2009, Basic Books: Amazon Digital Services, Inc. p. 290.

# Landgrunnurin uttan fyri 200 fjórðingar – løgfrøðilig og jarðfrøðilig atlit

*Við støði í Havrættarsáttmála Sameindu Tjóða verður í hesi grein greitt frá nøkrum landgrunsviðurskiftum, serliga við atliti at landgrunni Føroya uttan fyri 200 fjórðingamørkini í Norðurhøvum og á Føroya-Rockall Háslættanum. Føroysku landgrunskrøvini og leikluturin hjá Landgrunsnevndini undir Havrættarsáttmálanum verða viðgjørd, eins og nomið verður við marknaseting uttan fyri 200 fjórðingar millum lond, íroknað okkara egnu semju og ósemju við grannalondini ávikavist norðan fyri og sunnanfyri.*



**Bjørn Kunoy,**
doktari í løgfrøði, ráðgevi í Uttanríkisdeildini á Løgmansskrivstovuni.



**Martin V. Heinesen,**
jarðfrøðingur, Jarðfeingi, limur í Landgrunsnevnd Sameindu Tjóða.

*Rithøvundarnir eiga sjálvir øll sjónarmið í hesi grein, og tey samsvara ikki neyðturviliga sjónarmiðunum hjá Løgmansskrivstovuni, Jarðfeingi ella Landgrunsnevndini.*

> **„Havbotnurin og undirgrundin uttan fyri landgrunnin er altjóða øki. Tað hoyrir mannaættini til og verður umsitið av Altjóða Havbotnsmyndugleikanum.“**

## Innleiðing

Havrættarsáttmáli Sameindu Tjóða (United Nations Convention on the Law of the Sea, UNCLOS) varð undirritaður í desember 1982 og kom í gildi í 1994, eftir at tey fyrstu 60 londini høvdu staðfest hann. Síðan eru nógv lond løgst afturat, so at limalondini í dag eru 164 í tali. Kongsríki Danmarkar staðfesti Havrættarsáttmálan hin 16. november 2004, og samsvarandi galdandi reglum kom hann í gildi ein mánað seinni, hin 16. desember 2004.

Havrættarsáttmálin gevur strandalondum einkarrætt á øllum landgrunninum til leiting eftir og útvinning av ráevnum, íroknað búføstum botndjórasløgum, á og undir havbotninum. Grein 76 í sáttmálanum allýsir landgrunnin at røkka um alla meginlandsrondina ella út til 200 fjórðingar (fj) úr landi, har útjaðarin á meginlandsrondini ikki røkkur so langt út.

Havbotnurin og undirgrundin uttan fyri landgrunnin er altjóða øki. Tað hoyrir mannaættini til og verður umsitið av Altjóða Havbotnsmyndugleikanum, sum hevur heimstað í Kingston á Jamaika.

Tá eitt strandaland metir sín landgrunn røkka út um 200 fj, skal tað senda síni „landgrunskrøv“, t.e. nøktandi prófførslu um hetta, til Landgrunsnevnd Sameindu Tjóða (Commission on the Limits of the Continental Shelf, CLCS) í New York. Henda telur 21 limir, sum allir eru jarðvísindafólk, sum skulu viðgera tey einstøku krøvini og kanna um tey eru í fullum samsvari við galdandi reglur í Havrættarsáttmálanum og gera tilmæli til viðkomandi strandaland um ásetingina av landgrunsmarkinum uttan fyri 200 fj.

Skyldan at senda inn krøv til Landgrunsnevndina fevnir einans um øki uttan fyri 200 fj. Eingin skylda er um prófførslu, um meginlandsrondin ikki røkkur út um 200 fj.

Longu meðan samráðst varð um havrættarsáttmálan í tíðarskeiðinum 1973 – 1982, varnaðust føroyingar, at møguleiki kanska fór at verða at kanna sær landgrunn út um 200 fj á sonevnda Føroya-Rockall Háslættanum, og í 1980-árunum varð farið undir at gera kanningar við tí í huga at seta krøv fram har, tá ið tíðin varð búgvin. Í 1985 gjørdi danska stjórnin vegna Føroyar eina yvirlýsing, eina sonevnda „designering“, av føroyska landgrunninum, sum umframt økið innan fyri 200 fj eisini umfataði eitt øki uttan fyri 200 fj á Føroya-Rockall Háslættanum. Framman undan høvdu Bretland og Írland gjørt líknandi designeringar har, og dagin eftir donsku designeringina gjørdu íslendingar tað sama. Í 2003 varð farið undir miðvísar kanningar við tí í hyggju at leggja ítøkilig krøv fram fyri Landgrunsnevndina, nú ikki bert sunnan fyri, men eisini norðan fyri Føroyar.

Kongsríki Danmarkar hevur fimm øki, har meginlandsrondin røkkur út um 200 fj (sí mynd **1**). Tvey teirra eru við Føroyar, meðan trý eru við Grønland. Bæði landgrunskravið norðan fyri Føroyar (í Norðurhøvum ella Ægishavi) og sunnan fyri (á Føroya-Rockall Háslættanum) eru send til Landgrunsnevndina, eins og krav er sent inn um landgrunnin sunnan fyri Grønland, meðan tað enn verður arbeitt við at gera krøv klár at senda inn um eitt øki eystur úr Grønlandi og um økið við norðpólin. Hesi skulu samsvarandi Havrættarsáttmálanum latast inn í seinasta lagi í desember 2014, t.e. innan 10 ár eftir at sáttmálin varð settur í gildi fyri kongsríki Danmarkar.




**Mynd 1:** Tey 5 økini kring Føroyar og Grønland, har meginlandsrondin røkkur út um 200 fjórðingar.

## Jarðfrøðilig atlit í altjóðarættarligum høpi

Havrættarsáttmálin nýtir frøðiorð í einum rættarligum høpi, sum í summum førum víkir munandi frá góðkendum vísindaligum merkingum. Rættarliga fevnir heitið *landgrunnurin* sambært grein 76 í sáttmálanum um alla meginlandsrondina, t.e. bæði tann jarðfrøðiliga *landgrunnin*, *hellingina* og *undirhellingina*, meðan tann *djúpi havbotnurin* og *djúphavsryggir* á honum ikki eru partar av meginlandsrondini og tískil heldur ikki av rættarliga landgrunninum (sí mynd **2**).

Somuleiðis ásetir grein 76 reglur fyri, hvussu útjaðarin á meginlandsrondini kann setast við øðrum ella báðum av tveimum ymiskum mátingarfrymlum, sum báðir taka útgangsstøði í *hellingsfótinum*, sum er at finna við *hellingsstøðið*. Sambært øðrum teirra, sonevnda Gardinerfrymlinum, verður útjaðarin settur á knattstøðum (fikspunktum), har tjúkdin á legugrýtinum (sedimentunum) oman á føstu helluni undir havbotninum svarar til í minsta lagi 1% av stytstu fjarstøðuni inn til hellingsfótin. Hin, tann sonevndi Hedbergfrymilin, byggir á reina

**Mynd 2. Landgrunsmarkið uttan fyri 200 fj sett í stigum:**
**A.** Útjaðarin á meginlandsrondini verður máldur út frá hellingsfótinum (foot of slope) við øðrum ella báðum av tveimum frymlum. Sambært Gardinerfrymlinum kann hann setast á knattstøðum, har tjúkdin á legugrýtinum (h) svarar til í minsta lagi 1% av stytstu fjarstøðuni (d) inn til hellingsfótin. Sambært Hedbergfrymlinum kann hann røkka 60 fj út frá hellingsfótinum.
**B.** Landgrunnurin kann tó í mesta lagi røkka 350 fj úr grundlinjunum inni við land (fjarstøðuavmarkingin) ella 100 fj út um 2.500 metra dýpdarlinjuna (dýpdaravmarkingin).
**C.** Landgrunsmarkið uttan fyri 200 fj verður formliga sett við røttum linjum millum knattstøðupunktir í mesta lagi 60 fj hvør frá øðrum (reyðir prikkar).




*(Myndir frá GRID Arendal)*

fjarstøðu, t.e. at útjaðarin á meginlandsrondini kann røkka 60 fj út frá hellingsfótinum.

Hóast rættarligi landgrunnurin í útgangsstøðinum røkkur heilt út til útjaðaran á meginlandsrondini, ásetir grein 76 tvær ymiskar avmarkingar fyri hvussu langt út, landgrunnurin tó í mesta lagi kann røkka.

**„Landgrunnurin kann í mesta lagi røkka 350 fj úr grundlinjunum inni við land ella 100 fj út um 2.500 metra dýpdarlinjuna."**

Aftur her kann onnur ella hin – ella báðar í felag – veljast treytað av, hvør teirra er til størsta fyrimun hjá tí ávísa strandalandinum. Onnur teirra, tann sonevnda fjarstøðuavmarkingin, er ein linja, sum er 350 fj úr somu grundlinjum inni við land, haðani umveldismarkið og 200 fjórðingamarkið verða máld. Hin er ein sonevnd dýpdaravmarking, sum røkkur 100 fj út um 2.500 metra dýpdarlinjuna.

Ein serstøk regla ásetir, at á *undirsjóvarryggjum* er einans fjarstøðuavmarkingin galdandi, meðan báðar avmarkingarnar kunnu nýtast á undirsjóvargrunnum, sum kunnu metast at vera natúrligir partar av meginlandsrondini.

Av nevndu reglum eru nakrar meira arbeiðskrevjandi og/ella torgreiddar enn aðrar. Tað fyrsta krevjandi stigið er at finna fram til og skjalprógva, hvar rætta hellingsstøðið er, har hellingsfóturin skal finnast, haðani útjaðarin á meginlandsrondini skal mátast. Av teimum báðum frymlunum, ið kunnu nýtast til at seta henda útjaðara, krevur Gardinerfrymilin neyvar seismiskar dátur v.m. til m.a. at skjalprógva tjúkdina á legugrýtinum, meðan Hedbergfrymilin einans krevur máting av eini ávísari fjarstøðu (60 fj). Í førum, har kann tað vera ein fyrimunur at nýta dýpdaravmarkingarfrymilin heldur enn fjarstøðuavmarkingarfrymilin, kann ein annar krevjandi spurningur vera, um ein ávísur partur av havbotninum skal metast sum ein undirsjóvarryggur ella sum ein natúrligur partur av meginlandsrondini. Umframt dýpi og havbotnsskap spælir jarðfrøðiligt tilknýti til landøkið og meginlandsrondina sum heild ein týðandi leiklut, tá hesir spurningar skulu svarast.

Á meginlandsrondini norðan fyri Føroyar eru fleiri ryggir og aðrar undirsjóvarhæddir, sum røkka norður í Ægishav. Størstu teirra eru Íslandsryggur og Ægisryggur. Hesin seinni er staðið, har gamla meginlandið upprunaliga skrædnaði sundur millum Norðurevropa og Miðgrønland fyri umleið 55 mió. árum síðani, og har havbotnsspjaðingin fór fram ta fyrstu tíðina við umfatandi eldgosum. Hann „sløknaði" fyri umleið 30 mió. árum síðani, tá spjaðingin flutti vestur á Kolbeinseyryggin norður úr Íslandi. Ægisryggur røkkur væl út um 200 fj og er eitt av høvuðsgrundarløgunum fyri landgrunskravinum norðan fyri Føroyar, men av tí at hann er mettur at vera ein *undirsjóvarryggur* sambært grein 76 í Havrættarsáttmálanum, røkkur kravið ikki út um 350 fj úr grundlinjunum. Ein annar høvuðspartur av grundarlagnum fyri landgrunskravinum í Ægishavi eru tær tjúkku legugrýtislindirnar oman á føstu helluni undir havbotninum her á leiðini. Tær gera, at útjaðarin á meginlandsrondini við Gardinerfrymlinum kann setast longur úti enn 60 fj frá hellingsfótinum, har hann hevði verið settur við Hedbergfrymlinum, um legugrýtislindirnar ikki vóru nóg tjúkkar.

Landgrunskravið norðan fyri Føroyar fevnir um 87.792 km$^2$ (sí mynd **3A**).

Meginlandsrondin sunnan fyri Føroyar røkkur um allan Føroya-Rockall Háslættan og sostatt langt út um 200 fj (sí mynd **3B**). Hon er tann parturin




**Mynd 3A.** Landgrunskrøvini í Norðurhøvum **(A)** og á Føroya-Rockall Háslættanum **(B)**. Landgrunsmørkini út eftir eru sett við røttum linjum (vístar við brúnum strikum) millum knattstøðupunktir, sum í mesta lagi eru 60 fj hvør frá øðrum (víst við grønum prikkum). Grundlinjurnar inni við land eru teknaðar við bláum strikum, avtalaðar marknalinjur við grannalondini við svørtum strikum, og 200 fjórðingalinjur eru teknaðar við reyðum strikum. Landgrunskravið uttan fyri 200 fj norðan fyri Føroyar er 87.792 km2, og sunnan fyri er tað 608.890 km2 til víddar. Legg til merkis at mátistokkarnir eru ikki eins á teimum báðum kortunum, og at kort **(B)** er snarað 450 samanborið við **(A)**.




**Mynd 3B.**

av tí gomlu meginlandsrondini í Útnyrðingsevropa, sum skrædnaði frá Suðurgrønlandi samstundis, sum Ægisryggurin menti seg norðan fyri Føroyar, og eins og í Føroyum løgdust tjúkkar basaltfláir frá umfatandi eldgosum seg um somu tíð yvir stórar partar av øllum háslættanum. Framman undan høvdu støkkingar partvíst loyst háslættan frá restini av evropameginlandinum. Fram við háslættanum liggja umfatandi *undirsjóvarfannir* av fínum legugrýti (Hattonfonn vestantil, Edorasfonn sunnantil og Fenifonn sunnan- og eystantil, inn móti Rockallrennuni). Út fyri hellingsfótinum eru sumstaðni so mikið tjúkkar legugrýtislindir, at útjaðarin á meginlandsrondini við Gardinerfrymlinum er settur meiri enn 60 fj úti. Aðrastaðni eru tær tynri, og har er Hedbergfrymilin nýttur til at seta útjaðaran 60 fj út frá hellingsfótinum.

Landgrunskravið sunnan fyri Føroyar fevnir um 608.890 km$^2$ (sí Mynd **3B**).

## Altjóðarættarlig atlit í sambandi við føroysku landgrunskrøvini

Landgrunskravið norðan fyri Føroyar varð latið inn hin 29. apríl 2009. Samlað var hetta tað 29. av sínum slag, ið latið varð Landgrunsnevndini til viðgerðar, meðan kravið um Føroya-Rockall Háslættan varð latið nevndini hin 2. desember 2010, sum tað 52. í allari røðini.

*Uppgávan hjá Landgrunsnevndini*

Høvuðsuppgávan hjá Landgrunsnevndini er sum nevnt at kanna, um tey ávísu landgrunskrøvini eru í fullum samsvari við grein 76 í Havrættarsáttmálanum. Hetta kann illa gerast uttan at taka støðu til – í summum førum sera torgreið – løgfrøðilig atlit.

Landgrunsnevndin tekur ikki formligar avgerðir. Við støði í prógvførsluni frá strandalondunum ger hon tilmæli um ásetingina av teirra landgrunsmørkum, men formligu ásetingina gera londini sjálvi. Tilmælini frá Landgrunsnevndini mugu tó metast at vera rættarskapandi, m.a. tí at sambært grein 76 í Havrættarsáttmálanum eru eitt landgrunsmark uttan fyri 200 fj, ið er sett í tráð við tilmæli frá Landgrunsnevndini, „endaligt og bindandi". Leingi hevur ivi verið, um hesir endaligu og bindandi eginleikar einans galda mótvegis tí avvarðandi strandalandinum ella mótvegis øðrum londum eisini. Við øðrum orðum er spurningurin, um eitt tílíkt mark, ið er grundað á tilmæli frá Landgrunsnevndini, kann ógildast. Í einum altjóða dómi frá 14. mars 2012 í trætumáli millum Myanmar og Bangladesh (Bengaldóminum) segði Altjóða Havrættardómstólurin í Hamborg, at einans tey landgrunsmørk uttan fyri 200 fj, ið eru grundaði á tilmæli frá Landgrunsnevndini, eru endalig og bindandi. Við øðrum orðum sigur dómstólurin við hesum, at (i) landgrunsmørk uttan fyri 200 fj, ið ikki eru grundaði á tilmæli frá Landgrunsnevndini, eru ikki bindandi fyri onnur lond, eins og (ii) landgrunsmørk, ið eru grundaði á tilmæli frá Landgrunsnevndini, eru endalig og bindandi – væl at merkja fyri allar partar. Henda avgerð tykist tó at byggja á ta fatan, at øll tílík tilmæli frá Landgrunsnevndini eru í fullum samsvari við Havrættarsáttmálan. Uttan mun til at roknast kann við hesum, er tað ikki givið, at so er, og tískil kann bindingin mótvegis øðrum londum takast við ávísum fyrivarni.



Nevnda niðurstøða hjá Havrættardómstólinum vísir til marknaseting út ímóti altjóða øki, sum viðkomandi strandalond gera einsæris. Annar spurningur er, um tílík tilmæli frá Landgrunsnevndini eru neyðug, áðrenn landgrunsmørk kunnu setast uttan fyri 200 fj millum lond, har tvey ella fleiri teirra hava umskarandi krøv til sama landgrunn. Í Bengaldóminum var Havrættardómstólurin av tí fatan, at eitt tilmæli frá Landgrunsnevndini ikki neyðturviliga krevst fyri at áseta eitt tílíkt landgrunsmark. Hesin partur av dóminum var í stóran mun grundaður á ta fatan, at í altjóða løg er einans ein landgrunnur, og tí er eingin orsøk at skyna millum landgrunn innan fyri og uttan fyri 200 fjórðingar. Ávíst fyrivarni má tó takast mótvegis hesi fatan, m.a. við tilvísing til dóm hin 19. november 2012 í trætumáli millum Kolumbia og Nikaragua, har Altjóða Dómstólurin í Haag ikki vildi áseta landgrunsmark teirra millum uttan fyri 200 fjórðingar. Hóast fatanin hjá Altjóða Dómstólinum við hesum kann tulkast tann vegin, segði hann tó ikki greitt, at tílík landgrunsrættindi einans kunnu byggja á tilmæli frá Landgrunsnevndini, men einans at rætturin til landgrunnin uttan fyri 200 fj ikki var prógvaður. Tó so, tað skerst ikki burtur, at við hesum tók Altjóða Dómstólurin í Haag ávísa frástøðu til oman fyri nevnda úrskurð hjá Altjóða Havrættardómstólinum í Hamborg.

Støða Føroya hevur í stóran mun verið hon, at fyri at áseta landgrunsmørk millum lond er neyðugt at vita, hvussu langt út, rætturin til landgrunnin gongur hjá hvørjum landi, og at einans tilmæli frá Landgrunsnevndini kunnu vísa hetta. Tí verður tað mett neyðugt at bíða við at áseta tílík landgrunsmørk, til Landgrunsnevndin hevur gjørt síni tilmæli.

## Landgrunnurin norðan fyri Føroyar

Landgrunskrøv, ið latin eru Landgrunsnevndini, verða viðgjørd av undirnevndum, ið hvør telur sjey limir. Í løtuni verða seks ymisk krøv viðgjørd, íroknað kravið til landgrunn norðan fyri Føroyar.

Síðan tann undirnevndin varð sett á sumri 2012, hevur ein sendinevnd fyri Føroyar/Danmark tvær ferðir verið á fundum við hana í New York, og um einki óvæntað hendir, kann viðgerðin væntast liðug og tilmæli gjørt longu í 2013 ella í 2014.

Endamálið við fundunum millum sendinevnd Føroya/Danmarkar og undirnevndina er at tryggja eina fullfíggjaða viðgerð, og at landgrunsásetingin er í fullum samsvari við grein 76 í Havrættarsáttmálanum. Sendinevndin fær høvi at greiða nærri frá kravinum og sínum sjónarmiðum og at svara spurningum frá undirnevndini. Móti endanum av viðgerðini skal undirnevndin greiða frá síni støðu, sum sendinevndin fær høvi at viðmerkja, áðrenn undirnevndin ger sítt endaliga tilmæli til fullu Landgrunsnevndina. Eftir tað fær sendinevndin høvi at greiða frá sínum sjónarmiðum fyri fullu nevndini, áðrenn henda ger sítt formliga tilmæli um áseting av landgrunsmarkinum uttan fyri 200 fj.

**„Landgrunskravið uttan fyri 200 fj norðan fyri Føroyar er 87.792 km2, og sunnan fyri er tað 608.890 km2 til víddar."**

Á heysti 2006 gjørdu Føroyar/Danmark, Ísland og Noreg eina semju um framtíðar landgrunsmørk norðan fyri Føroyar (sí mynd **4**). Av økinum uttan fyri 200 fj her á leiðini, sum samanlagt er 111.528 km$^2$ til víddar, verða Føroyum sambært semjuni tillutaðir 27.000 km$^2$, Íslandi 29.000 km$^2$ og Noregi (saman við Jan Mayen) 55.528 km$^2$. Semjan varð gjørd, áðrenn partarnir høvdu lagt síni landgrunskrøv fyri Landgrunsnevndina, og er treytað av tilmæli frá Landgrunsnevndini um, at landgrunnurin hjá hvørjum einstakum landi fevnir um í minsta lagi so mikið stór øki, sum hesi tøl vísa – og sum kunnu vera umskarandi. Semjan tekur tó hædd fyri, at tilmælini frá Landgrunsnevndini kunnu geva einum ella fleiri av pørtunum minni enn vístu tøl, meðan tey kunnu geva onkrum øðrum parti meiri. Tá verður „avlopið" frá einum parti býtt millum hinar partarnar eftir lutfallinum 40/40/60. Tað merkir, at um Noreg sambært tilmælinum frá Landgrunsnevndini fær tillutað minni enn 55.528 km$^2$ av landgrunni í hesum øki, meðan Føroyar og Ísland fáa tillutað meiri enn ávikavist 27.000 km$^2$ og 29.000 km$^2$, býta tey „avlopið" frá Noreg javnt ímillum sín. Samsvarandi fær Noreg 60% og Ísland ella Føroyar 40% av einum møguligum „avlopi" frá ávikavist Føroyum ella Íslandi. Um tveir av pørtunum fáa tillutað minni enn útgangstølini í avtaluni vísa, meðan tann triði parturin fær meira, fellur alt avlopsøkið til henda partin, tó ikki meiri enn honum verður tillutað sambært tilmælinum frá Landgrunsnevndini. Um so er, at onkur partur av økinum sambært tilmælinum ikki er partur av landgrunninum hjá nøkrum av pørtunum, men




**Mynd 4:** Landgrunsbýtið í Ægishavi millum Føroyar, Ísland og Noreg, sambært semjuni frá 2006 – víst við grønum linjum.

hoyrir altjóða samfelagnum til, verður tað sjálvandi góðkent.

Tá eitt strandaland letur inn landgrunskrav á einum øki, skal tað sambært mannagongdarreglunum hjá Landgrunsnevndini upplýsa, um onnur lond hava krøv á sama øki. Um so er, kann Landgrunsnevndin einans viðgera kravið, um hitt ella hini kravlondini á økinum geva heimild til tess. Partur av trípartasemjuni var tí eisini, at allir partar góðkenna, at Landgrunsnevndin tekur krøvini hjá hinum pørtunum til viðgerðar.

Her kann leggjast afturat, at longu sama heyst (2006) læt Noreg síni krøv inn til Landgrunsnevndina. Sambært tilmælinum frá nevndini, sum varð latið Noreg á vári 2009, røkkur tann norski landgrunnurin uttan fyri 200 fj. um nærum alt tað nevnda økið, t.e. umleið 108.000 km². Í løtuni verða bæði tað føroyska og tað íslendska kravið viðgjørd av hvør síni undirnevnd. Tá formligu tilmælini hesum viðvíkjandi eru komin, skulu partarnir aftur møtast fyri væntandi at staðfesta semjuna frá 2006.



# Føroya-Rockall Háslættin

Landgrunskrav Føroya/Danmarkar á Føroya-Rockall Háslættanun røkkur umleið 800 fj úr landi og umskarar landgrunskrøv frá Írlandi og Bretlandi á háslættanum. Ísland metir seg eisini hava rætt til landgrunn har úti, men hevur enn ikki latið formligt krav um hetta til Landgrunsnevndina. Írland og Stórabretland gjørdu longu í 1988 sínámillum marknasemju á økinum, og teirra formligu krøv, ið vórðu latin Landgrunsnevndini 21 ár seinni, virða hesa semju og røkka ikki tvørtur um avtalaða markið. Ein tílík semja ella sáttmáli hevur tó samsvarandi altjóða sáttmálarætti ongan rættarligan virkna fyri onnur lond.

Stutt eftir at Stórabretland og Írland lótu Landgrunsnevndini síni krøv, fráboðaðu Føroyar/Danmark og Ísland, at tey ikki heimilaðu viðgerð av hesum krøvum. Føroyar/Danmark løgdu sum treyt fyri møguligari viðgerð, at føroyska kravið verður viðgjørt samstundis. Orsøkin er, at fatanin av kravgrundarlagnum við atliti at Havrættarsáttmálanum kann vera so mikið ymisk, at Landgrunsnevndin illa kann geva øðrum krøvum á háslættanum eina nóg holla viðgerð uttan at kenna okkara støðu og kravgrundarlag til fulnar. Ísland sýtti har aftur ímóti uttan nærri frágreiðing – eisini viðgerðini av tí føroyska kravinum.

Partar í eini marknatrætu hava eina altjóðarættarliga skyldu at royna at finna fram til eina *rættvísa* semju. Høvuðstrupulleikin er tó ofta ein ósemja um, hvørji atlit skulu avgera, hvør marknalinja er tann mest rættvísa.

Síðan 2001 hava øll fýra londini, ið gera krav á Føroya-Rockall Háslættanum, javnan møtst fyri at royna at finna felags stev í marknaspurninginum. Ein av fleiri spurningum er, í hvønn mun miðlinjureglan kann vera eitt hóskandi rættvísismát uttan fyri 200 fj, eins og hon verður mett at vera innan fyri 200 fj. Støða Føroya er, at miðlinjureglan ikki kann nýtast á sama hátt sum rættvísismát í marknamálum uttan fyri 200 fj, sum hon verður nýtt í marknamálum innan fyri 200 fj. Hin vegin hava vit sæð, at Bengaldómurin hjá Altjóða Havrættardómstólinum tykist at leggja til grund, at miðlinjureglan er galdandi uttan fyri eins væl og innan fyri 200 fj við tí grundgeving, at tað í altjóða rætti einans er talan um ein landgrunn, sum ikki heimilar at gera mun á landgrunsøkinum innan fyri og uttan fyri 200 fj.

**„Partar í eini marknatrætu hava eina altjóðarættarliga skyldu at royna at finna fram til eina rættvísa semju. Høvuðstrupulleikin er tó ofta ein ósemja um, hvørji atlit skulu avgera, hvør marknalinja er tann mest rættvísa.“**

**Mynd 5:** Landgrunsverkætlanin fekk til vegar hópin av nýggjum havbotnsdátum. Myndin vísir ein skurð gjøgnum jarðarskorpuna sunnan fyri Føroyar frá seismiskum dátum.




Vert er at leggja til merkis, at Bengaldómurin tykist ikki at taka hædd fyri tí geometriska grundarlagnum fyri eini tílíkari miðlinju, sum verður máld frá somu grundlinjum inni við land, sum 200 fjórðinga landgrunsmarkið. Ein miðlinja innan fyri 200 fj liggur tískil altíð í tí umskarandi geometriska økinum, har partarnir hava javnbjóðis landgrunsrættindi, og í útgangsstøðinum býtir hon hetta øki í nøkulunda javnar partar. Altjóða Dómstólurin í Haag hevur gjørt greitt, at hesin eginleiki hjá miðlinjuni er sjálvt grundarlagið fyri, at miðlinjureglan er eitt grundleggjandi rættvísismát í marknamálum innan fyri 200 fj. Sum greitt verður frá niðan fyri tykist tað ikki skynsamt eisini at lata hesa reglu galda uttan fyri 200 fj, og Bengaldómurin er jú einans tann fyrsti veruligi dómurin av sínum slag.

„Ein spurningur er hvussu miðlinjureglan kann vera eitt hóskandi rættvísismát uttan fyri 200 fj, eins og hon verður mett at vera innan fyri 200 fj. Støða Føroya er, at miðlinjureglan ikki kann nýtast á sama hátt sum rættvísismát í marknamálum uttan fyri 200 fj, sum hon verður nýtt í marknamálum innan fyri 200 fj.“

Framtíðar viðgerðin hjá altjóða dómstólum og gerðarrættum av hesum spurningi fer í stóran mun at avgera, um miðlinjureglan fær somu rættarstøðu uttan fyri sum innan fyri 200 fj. Somuleiðis kunnu komandi marknasemjur uttan fyri 200 fj millum lond fáa ávirkan á, hvussu dómstólar og gerðarrættir fara at meta um spurningin. Í hesum sambandi skal sigast, at í semjuni frá 2006 um býti av landgrunni norðan fyri Føroyar varð ikki tikið serligt atlit til miðlinjuregluna.

Nýliga undirskrivaða marknasemjan uttan fyri 200 fj millum Ísland og Grønland í Irmingerhavinum hevur serligan áhuga í hesum sambandi. Har fekk miðlinjan ongan leiklut av tí einføldu orsøk, at hon liggur nærum øll, sum hon er, uttan fyri umskarandi landgrunsøkið, sum semjan snýr seg um. At tílíkt kemur fyri er ein einføld avleiðing av, at útbreiðslan av landgrunsøkinum uttan fyri 200 fj tekur støði í hellingsfótinum, sum einki geometriskt tilknýti hevur til grundlinjurnar inni við land. Tí kann ein miðlinja, máld frá grundlinjunum, ganga heilt aðrar leiðir enn landgrunsøkið, og hon kann tí illa metast at vera eitt haldgott grundarlag fyri einum rættvísum býti av einum umskarandi øki, har partarnir í útgangsstøðinum hava javnbjóðis landgrunsrættindi.

Marknaósemjan á Føroya-Rockall Háslættanum fevnir tó ikki einans um, hvørji rættvísismát skulu galda. Londini eru heldur ikki samd um, hvørt Landgrunsnevndin skal viðgera tey ymisku krøvini, áðrenn marknasemja verður gjørd ella aftaná. Í prinsippinum vil ein møguligur máti at loysa henda trupulleika vera, eins og gjørt varð í Ægishavi, at gera eina marknasemju, áðrenn Landgrunsnevndin viðger krøvini, men gera hana treytaða av tilmælunum frá nevndini soleiðis at hon t.d. kann broytast, um kravið hjá einum strandalandi, ið liggur til grund fyri semjuna, ikki – ella ikki til fulnar – verður gingið á møti.

Sigast kann sostatt, at í ávísan mun eru tað mannagongdaratlit, sum forða fyri eini semju um býti av Føroya-Rockall Háslættanum. Støðan kann tó hugsast at ávirkast av Bengaldóminum, har ein marknalinja varð sett uttan fyri 200 fj uttan mun til, at tilmæli frá Landgrunsnevndini í sambandi við landgrunskrøv á økinum ikki vóru tøk. Í roynd og veru var høvuðsorsøkin til, at Altjóða Havrættardómstólurin ásetti eina linju uttan fyri 200 fj, at Bangladesh hevði nýtt sýtingarrætt sín og soleiðis forða Landgrunsnevndini at viðgera landgrunskravið frá Myanmar. Sambært dómstólinum hevði talan verið um eina „catch 22 støðu", um hann sýtti fyri at áseta eina marknalinju uttan fyri 200 fj. Uttan mun til at finnast kann hvassliga at fleiri atlitum, ið liggja til grund fyri hesi niðurstøðu, kann tað hugsast, at rættarstøða Føroya í sambandi við Føroya-Rockall Háslættan kann broytast, um henda tulking eisini verður endurspeglað í úrskurðum hjá øðrum altjóða dómstólum og/ella gerðarrættum. Tá verður nevniliga ikki neyðugt, at Landgrunsnevndin viðger krøv og ger tilmæli, áðrenn marknalinjur verða settar. Hetta er tó lítið sannlíkt. Í hesum sambandi kann vísast til úrskurðin hjá Altjóða Dómstólinum í Haag í trætumálinum millum Nikaragua og Kolumbia. Sum nevnt omanfyri, var dómstólurin av tí fatan, at hóast tað einans er ein landgrunnur í altjóða lóg, var ikki víst, hvussu langt sjóvegis rætturin hjá londunum rakk út, og tískil kundu marknalinjur ikki ásetast millum lond uttan fyri 200 fj uttan fyriliggjandi tilmæli frá Landgrunsnevndini um útbreiðsluna av landgrunninum.

# At enda

Longu í 1980-unum byrjaðu kanningar av landgrunninum uttan fyri 200 fj sunnan fyri, men í 2003 varð av álvara farið undir miðvíst landgrunnsarbeiði við tí fyri eyga at fyrireika landgrunskrøv Føroya, bæði fyri norðan og fyri sunnan. Komið var á eitt vegamót í 2009 og 2010, tá landgrunskrøvini ávíkavist í Ægishavi norðan fyri og á Føroya-Rockall Háslættanum sunnan fyri Føroyar vórðu latin Landgrunsnevndini. Á sumri 2012 byrjaði veruliga viðgerðin av kravinum norðanfyri, og hugsast kann, at tað arbeiðið verður skjótt liðugt.

Í nevnda øki er marknasemja longu gjørd við Noreg og Ísland, og tí kann tað væl hugsast, at løgdømi Føroya í næstum verður víðkað til eisini at fevna um í minsta lagi hesar 27.000 ferkilometrar av landgrunni, um so er, at tilmælið frá Landgrunsnevndini ikki gerst minni enn tað.

Útlitini til eina endaliga greiðu á marknatrætuni um Føroya-Rockall Háslættan tykjast heldur longri, men tó sera spennandi fyri Føroyar.



Fysisku karmarnir hjá Fróðskaparsetrinum hava verið og eru framvegis ein trupulleiki í gerandisdegnum. Meginfyrisitingin er á Setursskrivstovuni í gamla bókasavnsbygninginum við J.C.Svabosgøtu, og vónir eru um at savna alla undirvísingina í nærumhvørvinum.

# Samstarv fær Fróðskaparsetrið at vaksa



Helgi Jacobsen

Fróðskaparsetur Føroya tillagar seg í hesum døgum til ein nýggjan bygnað. Mørkini millum deildirnar kámast og ein meiri einsháttað skipan skal gera tað lættari at menna tvørgangandi undirvísing og gransking. Samstundis er kósin sett at altjóðagera føroyska universitetið. Tað týdningarmesta hjá Setrinum er at vaksa – at fáa fleiri lesandi og fleiri útbúgvingar, ið eru grundaðar á dygdargóða gransking. Tað kann bara lata seg gera í samstarvi við granskingarstovnar og fakstovnar í Føroyum og í einum økissamstarvi við universitet í grannalondunum.

Fróðskaparsetur Føroya fær ikki ta støddina og ta megina, sum útlendsk universitet hava. Til tess eru umstøðurnar ov smáar. Kortini er høvuðsmálið hjá Setrinum at vaksa. At fáa fleiri lesandi og fleiri útbúgvingar. Málið er somuleiðis at altjóðagera lærustovnin á Debesartrøð.

Skal setningurin um vøkstur og altjóðagerð røkkast, er neyðugt at brúka tey amboð, sum eru til taks. Eitt av hesum amboðum er samstarv, bæði við aðrar stovnar í Føroyum, men eisini við universitetini í grannalondunum.

Tá hava lesandi møguleika at seta saman sínar útbúgvingar øðrvísi, enn nú, og tá fær Setrið eisini møguleika at byggja eina skrá upp, har fólk lesa ein part í Føroyum og ein annan part aðrastaðni.

„Vit hugsa okkum eitt styrkt norðurlendskt økissamstarv, har føroysk lesandi fara uttanlands til partar av útbúgvingini og har útlendingar fáa høvi at taka partar av sínum útbúgvingum í Føroyum, antin á enskum ella norðurlendskum málum."

Tað er rektarin á Fróðskaparsetrinum, Sigurð í Jákupsstovu, sum í eini vangamynd av Setrinum sigur sína hugsan um framtíðarmálið við føroyska universitetinum. Sigurð í Jákupsstovu hevur verið rektari á Setrinum í skjótt tvey ár og fyri honum hevur tað sera stóran týdning at menna føroyska lærustovnin.

Hann heldur, at samstarv er eitt av lyklaorðunum at fáa Setrið at vaksa, bæði í vavi og dygd.

„Vit vilja víðka útboðini hjá okkum í samstarvi við onnur universitet og á tann hátt draga granskarar til okkum, sum kunnu vara av nýggjum fakøkjum. Harvið fáa vit grundarlag at bjóða lesandi nógv fleiri møguleikar," sigur Sigurð í Jákupsstovu.

## Nýggjur bygnaður fyritreyt

Ein høvuðstreyt fyri at gera tað møguligt at menna Fróðskaparsetrið, var at broyta visjónina fyri hægri lestri í Føroyum. Hendan tilgongdin byrjaði við eini nýggjari lóg fyri Fróðskaparsetur Føroya, sum kom í 2008.

Lógin setur krav um at seta eitt sjeymannastýri, har mentamálaráðharrin velur fýra limir uttan fyri Setrið. Afturat eru tvey starvsfólkaumboð og eitt umboð fyri tey lesandi.

Stýrið setur rektara, fyrisitingarstjóra og dekanar. Framman undan var eitt felagsstýri við setursráði, ið valdi rektaran.

Fróðskaparsetur Føroya bygdi á Føroyamálsdeildina, Náttúruvísindadeildina og Søgu- og samfelagsdeildina. Við lógini í 2008 komu Sjúkrasystraskúlin og Læraraskúlin afturat, soleiðis at talan nú er um fimm deildir.

**„Alsamt fleiri, sum fáast við útbúgving og gransking, siga, at samfeløg sigla vandakós, sum ikki hugsa um at integrera nýggja vitan við samfelagsvirksemi sum heild. Vit mugu lata upp og arbeiða tvørtur um fakmørk. Tú kemur onga leið, um vitanarpartarnir byrgja seg inni, og hetta er serliga galdandi í smáum samfeløgum, sum tí føroyska."**

Sigurð í Jákupsstovu

Høvuðsbygnaðurin varð umskipaður. Nú eru tvær megindeildir ella fakultet. Ein megindeild er fyri hugvísindi, samfelagsvísindi og námsvísindi og er grundað á Føroyamálsdeildina, Søgu- og samfelagsdeildina og Lærarakúlan – nú Námsvísindadeildin. Hin megindeildin er fyri náttúruvísindi og heilsuvísindi og byggir á Náttúruvísindadeildina og Sjúkrarøktarfrøðiskúlan – nú Sjúkrarøktarfrøðideildin.

## Samstarv tvørtur um mørk

Sigurð í Jákupsstovu sigur, at eitt mál er at fáa samstarv tvørtur um deildarmørk til tess at víðka útbúgvingarmøguleikarnar.

Í nøkrum førum er hetta nokk so upplagt, í øðrum førum er tað ikki so eyðsýnt, men av tí at deildirnar eru skipaðar í megindeildir og tí undir somu leiðslu, koma møguleikar undan kavi við samvirkandi fyrimunum.



Sigurð í Jákupsstovu, rektari á Fróðskaparsetri Føroya, greiðir frá um bygnaðin og framtíðina hjá Fróðskaparsetrinum.

**Fróðskaparsetur Føroya**

Fróðskaparsetur Føroya varð stovnað í 1965 við tí latínska heitinum Academia Færoensis. Endamálið var at inna vísindaligt rannsóknarstarv og hægri undirvísing. Fróðskaparsetrið byrjaði virksemið við einum professara, Christiani Matras, og einum skrivara, Maud Heinesen. Virksemið tey fyrstu árini fevndi um ársskeið í náttúrusøgu og í føroyskum fyri lærarar. Hetta vóru skeið, sum Fróðskaparfelagið hevði tikið stig til og sum Fróðskaparsetrið helt áfram við.

Stovnurin er í høvuðsheitum alment fíggjaður, tvs. at stovnurin við øllum deildunum fær eina árliga játtan á løgtingsfíggjarlógini, sum seinastu árini hevur ligið um 70 mió. kr. Seinnu árini eru fleiri eksternt fíggjaðar verkætlanir settar í verk. Her er talan um bæði ph.d. og aðrar granskingarverkætlanir, sum verða fíggjaðar av Granskingarráðnum, Forskningsstyrelsen, oljufeløgum og øðrum.

**„Málið hjá Fróðskaparsetrinum er eitt sterkt granskingarumhvørvi, fleiri útbúgvingar og gott netverk.“**

Í dag hava til dømis Føroyamálsdeildin og Námsvísindadeildin ikki nógv til felags, men tað er væl hugsandi, at Føroyamálsdeildin lyftir onkra uppgávu í læraraútbúgvingini heldur enn at deildirnar virka hvør í sínum lagi. Men heilt einfalt er tað kortini ikki.

## Nýggjar útbúgvingar

Í søgu- og samfelagsvísindum er støðan nøkulunda tann sama, sum í áðurnevnda føri. Við at hyggja at, hvørjir samvirkandi fyrimunir kunnu vera millum Føroyamálsdeildina og Søgu- og samfelagsdeildina og Námsvísindadeildina fyri nýggjum granskingarøkjum og útbúgvingum, hyggur leiðslan eftir, hvussu hon kann káma deildarmørkini, soleiðis at tað verður lættari at flyta seg ímillum.

„Møguleiki skuldi verið hjá teimum lesandi at flutt ímillum tær ymsu deildirnar. Tað kunnu tey ikki so lættliga í dag, serliga tí útbúgvingarbygnaðurin á teimum ymsu deildunum er so ólíkur. Á teimum stóru universitetunum kanst tú fyrst lesa onkra lærugrein á einari deild, flyta til eina aðra og so venda aftur til fyrstu deildina. Men tað krevur tillagingar til innihald og útbúgvingarstig og fer tí at taka nakað av tíð, áðrenn vit røkka hesum.

Taka vit Náttúruvísindadeildina og Sjúkrarøktarfrøðideildina, so eru kanska ikki so nógvir eyðsýndir felagsnevnarar har enn, men í lívfrøði og sjúkrarøkt eru nøkur viðurskifti, sum renna saman, til dømis genetikkur, lívevnafrøði og fysiologi, og har ber ivaleyst til at miða eftir samstarvi, eisini innan gransking,“ sigur Sigurð í Jákupsstovu.

## Setrið verður altjóðagjørt

Lógin, sum kom í 2008, legði upp til at altjóðagera tað føroyska universitetið.

Setast mugu somu krøv til Setrið, sum til útlendsk universitet. Ein liður í hesum er at leggja virksemið til rættis samsvarandi sonevndu Bologna-ásetingunum, ið seta karmar fyri, hvussu universitet skulu virka og samstarva. Hesar ásetingarnar vórðu fyrstu ferð staðfestar í 1999 millum universitetini í 29 ES-londum og snúgva seg um at skipa bygnaðin á universitetsútbúgvingunum eftir einum felags leisti til eitt nú at tryggja flytføri, dygd og gjøgnumskygni.

## Útbúgvingar á granskarastigi

Eftir at fyrstu hægru útbúgvingarnar byrjaðu á Føroyamálsdeildini í 1960-árunum og á náttúruvísindaligu støðisútbúgvingini fyrst í 1970-árunum, menti Fróðskaparsetrið so líðandi sínar útbúgvingar innan fyri karmarnar í gomlu lógini.

Tá so nýggja lógin kom í 2008 og Læraraskúlin og Sjúkrarøktarfrøðiskúlin løgdust afturat Setrinum, øktist talið av útbúgvingum og talið av lesandi nógv í vavi.

Sjúkrarøktarfrøðideildin hevði longu ment sínar útbúgvingar til bachelorútbúgvingar, og við lógini frá 2008 vórðu útbúgvingarnar á Læraraskúlanum eisini lyftar upp á bachelorstig.

Hetta varð gjørt fyri at gera hesar útbúgvingarnar granskingargrundaðar, soleiðis at tey sum lesa har fáa atgongd til nýggjastu vitanina og læra at viðgera hesa kritiskt og vísindaliga. Samstundis gevur tað bæði sjúkrarøktarfrøðingum, lærarum og námsfrøðingum grundarlag fyri víðari lesnaði á øðrum universitetum.

Hetta letur upp fyri nógv fleiri møguleikum og ber eisini í sær, at útbúgvingarnar til dagstovna- og fólkaskúlaøkið eru betri ílatnar til at menna tað arbeiðið, sum fer fram á dagstovnum og í fólkaskúlanum.

Tey lesandi fáa nøkur øðrvísi arbeiðsamboð, sum tey kunnu brúka til at menna teirra arbeiði og lyfta stovnarnar upp.

## Nýggj gransking – nýggjar útbúgvingar

Eitt av málunum hjá leiðsluni á Setrinum er at fara undir nýggja gransking og nýggjar útbúgvingar. Ein møguleiki er innan heilsugransking og heilsuútbúgving.

Arbeitt verður t.d. við at menna eina masterútbúgving í heilsuvísindum. Ein grundútbúgving í læknavísindum er eisini hugsandi.

Landssjúkrahúsið er vaksið nógv og tað er lætt at ímynda sær fyrimunirnar við øktum samstarvi. Yngru læknarnir vilja fegnir hava møguleika fyri at granska, og oftani er júst hetta ein fyritreyt, sum er neyðug fyri at fáa góðar læknar til landið. Í slíkum førum kunnu læknar hava partvíst starv á Setrinum og partvíst starv á Landssjúkrahúsinum. Slíkt er heilt vanligt aðrastaðni.

## Løgfrøði, orka og búskapur

Í løgfrøði er Setrið komið so langt ávegis, at klárt er at bjóða eina masterútbúgving. Hetta er ein áhugaverd og gongd leið, heldur Sigurð í Jákupsstovu. Føroyingar, sum hava lisið bachelor í jura í Danmark ella aðrastaðni, fáa nú møguleika at taka eina masterútbúgving í Føroyum. Útlendingar, sum kundu hugsast at granska í føroyskum viðurskiftum, kunnu eisini koma til Føroya.

Ein spennandi bachelorútbúgving í orku- og umhvørvisverkfrøði verður somuleiðis boðin út í heyst. Hugsanin er, at tey sum taka hana, kunnu taka sína framhaldsútbúgving á universitetum í okkara grannalondum. Til dømis er avtala longu gjørd við DTU um framhaldslestur

„Orkuspurningurin er globalur. Meira enn hvør fimta króna av okkara innflutningi fer til olju, og

**Útbúgvingar, sum Setrið bjóðar í 2013**
- Bachelor í føroyskum málið og bókmentum – *trý ár.*
- Bachelor í smátjóðum og altjóðagerð – *trý ár.*
- Bachelor í politikki og umsiting – *trý ár.*
- Bachelor í sosialvísindum og samfelagsplanlegging – *trý ár.*
- Sjúkrarøktarfrøði – útbúgving á bachelorstigi – *fýra ár.*
- Læraraútbúgving á bachelorstigi – *fýra ár.*
- Námsfrøðiútbúgving á bachelorstigi – *fýra ár.*
- Bachelor í orku- og umhvørvisverkfrøði – *trý ár.*
- KT verkfrøði
- Lívfrøði

Bygnaðurin á Fróðskaparsetur Føroya eftir lógarbroytingina í 2008.







Á Jobmatch og Vísindavøkum hevur Fróðskaparsetrið gjørt vart við teir útbúgvingar- og starvsmøguleikar, sum eru í Føroyum.




Hugsaðar útbyggingar av Fróðskaparsetri Føroya á Debesartrøð/Frælsinum.

vit mugu ásanna, at vit hava ikki flutt okkum serliga nógv seinastu árini. Tað gongur nógv seinni, enn tað átti at gjørt. Vit vita, at komandi árini verður neyðugt at gagnnýta fleiri ymiskar orkukeldur, og at neyðugt verður við klókum skipanum, har brúkari og veitari samvirka. Tí er tað viðkomandi hjá okkum at taka orkuspurningin upp. Tað hevur samband við, hvussu samfelagið innan orku skal fóta sær í framtíðini," sigur Sigurð í Jákupsstovu.

Í hesi útbúgvingini er ætlanin, at tann lesandi tekur fýra semestur í Føroyum, tað fimta semestrið í einum øðrum landi og kemur so aftur á Setrið at skriva bachelor-ritgerðina. Vit arbeiða við at knýta sambond til fleiri universitet soleiðis at fleiri møguleikar verða at leggja lesnaðin til rættis.

Skrivaraupgávan hjá Búskaparráðnum er flutt til Setrið, og við teimum førleikum, sum Setrið hevur framman undan á hesum øki, vera trý til fýra fólk, sum kunnu arbeiða við búskaparfrøði, og tá er Setrið eisini nær við at hava tað, sum skal til, fyri at seta eina útbúgving í verk innan hetta fakøkið.

## Vinnuligt samstarv

Ein annar partur í bæði gransking og útbúgving er at Setrið kemur í betri samband við vinnulívið. Sigurð í Jákupsstovu heldur, at tað er upplagt og neyðugt hjá Setrinum at fara inn í nýggja Granskarasetrið iNOVA, ið nú letur upp í hølum á Hoyvíksvegnum, tí tað kann verða eitt gott møtipláss hjá vinnuni og Setrinum.

Tað er neyðugt at slóða fyri vøkstri í okkara høvuðsvinnum, ali- og fiskivinnuni. Við at arbeiða við virðisøking av okkara útflutningsvinnum skapast eisini vakstrarmøguleikar fyri øðrum vinnum í Føroyum. Alivinnan er í eini støðugari menningartilgongd, har tørvur er á at loysa trupulleikar við fóðri, plássi og sjúku, og ofta er tað gransking, sum tá skal til.

Tí er tað eyðsæð at gagnnýta teir samvirkandi fyrimunir, ið umhvørvið á granskarasetrinum kann bjóða. Fróðskaparsetrið hevur til dømis í longri tíð samstarvað við Fiskaaling um granskingarverkætlanir og í løtuni eru trý ph.d.-lesandi knýtt at hesum samstarvi. Við granskarasetrinum skapast ein góður pallur fyri samstarvi millum vinnu og gransking.

Bæði nýggj vitan og arbeiðspláss kunnu spretta úr samstarvinum við granskarasetrið. Nógv av teimum sýnum, sum verða tikin í Føroyum, men sum í dag verða send av landinum til kanningar, kunnu í framtíðini verða kannaði á nýggju royndarstovunum.

Við at samstarva um keyp, rakstur og viðlíkahald av tólbúnaði ber til at fáa tól til vega, sum geva okkum nógv betri møguleikar at fremja granskingarverkætlanir og sýniskanningar her á landið.

**„Ítøkiliga arbeiða vit við málum um hvussu vit kunnu vaksa. Hvat er møguligt? Hvussu nógv lesandi kunnu vit hava um 10 ár? Slík viðurskifti umrøða vit alla tíðina.“**

Sigurð í Jákupsstovu

## Vinnuháskúlin

Ein annar møguleiki fyri spennandi útbúgvingum og granskingarsamstarvi er Vinnuháskúlin, sum liggur beint við Setrið.

„Vit hugsa okkum, at maskinmeistarar, sum vilja fara víðari, kunnu koma á Setrið at lesa verkfrøði. Skipsførarar kunnu lesa jura, sjórætt ella shipping. Tí má málið vera at taka bæði tær hugburðsligu og tær reint útbúgvingarligu fortreytirnar fyri samstarvi burtur," heldur Sigurð í Jákupsstovu.

## Setrið skapar búskaparvøkstur

Siðvandu hægri lærustovnarnir bygdu á at varðveita mentanararvin og at tryggja samfelagnum vitan og útbúgvið fólk. Granskingin vendi sær móti humaniora og náttúru- og læknavísindum. Tað snúði seg um at útbúgva lærarar, sjúkrarøktarfrøðingar, løgfrøðingar, búskaparfrøðingar, verkfrøðingar, prestar og læknar til tess at nøkta samfelagstørvin. Universitetini hava søguliga sæð altíð verið óheft, leys av politiskum valdi og í stóran mun sjálvfíggjandi. Universitetini vóru tá ikki opin fyri fjøldini.

„Í dag eru eru krøvini munandi víðkaði. Universitetslestur er opin fyri øllum, universitetini eru alment fíggjaði og krøvini frá samfelagnum til lærustovnarnar eru munandi herd og sjónlig. Av tí at granskingarevnini eru nógv fleiri og samantvinnaði – tey eru vorðin meiri tematisk, – er nú neyðugt at arbeiða við hugtøkum sum tvørfakligleiki, nýskapan, vinnuvøkstur og myndugleikatænastu. Fakøkir, sum fyrr ikki høvdu nógv samband, finna nú saman til at vinna á samfelagsavbjóðingum. Fráststøðan millum universitet og samfelag er burtur og uppáhaldið um at gransking gekk fyri seg í fílabeinstornum, leys av samfelagnum, er ikki til longur. Breið semja er um, at gransking og útbúgving er lykilin til at skapa og tryggja eina burðadygga framtíð," sigur Sigurð í Jákupsstovu.

Hann minnir á, at ES hevur ásannað, at bæði miðstaðarøkini og útjaðarin hava stórar trupulleikar at dragast við og at hesir trupulleikar bert kunnu loysast við nýhugsan, gransking og menning. Tí brúkar ES nógvar pengar til gransking og setur krøv til universitetini um góðskutrygging, gjøgnumskygni og samstarv.

„Hetta sama kravið er galdandi fyri okkum. Vit kunnu ikki virka uttan at fyrihalda okkum til samfelagið og tess avbjóðingar. Vit eru tí farin undir eina strategiska menningartilgongd. Hetta byrjar til dømis við at vit orða tilverurættin hjá Setrinum, har vit siga, at Fróðskaparsetrið framtíðartryggjar føroyska samfelagið og at Fróðskaparsetrið skapar búskaparvøkstur. Royndirnar vísa, at har eitt sterkt granskingar- og útbúgvingarumhvørvi finnst, har er vøkstur. Tí er neyðugt fyri føroyska samfelagið at Setrið veksur. At vit raðfesta dygdargóða óhefta gransking og útbúgving, økta altjóðagerð, økt samstarv við stovnar og vinnulív, nýskapan og arbeiðspláss," staðfestir Sigurð í Jákupsstovu.

## Tørvur á umhvørvi

Fysisku karmarnir hjá Fróðskaparsetrinum hava verið og eru framvegis ein trupulleiki í gerandisdegnum. At lesandi og starvsfólk ikki hava eitt felags umhvørvi, er ikki serliga stimbrandi og lokkandi. Og royndirnar hava víst, at tað er trupult at bróta siðvenjurnar.

Málið er tí at fáa eitt kampusumhvørvi við felagshølum, bókasavni, matstovu og arbeiðshølum. Hugsanin er, at gamla Bátasavnið verður tikið niður og at ein størri bygningur verður gjørdur, sum kann vera eitt slag av høvuðsbygningi. Eisini er ynskiligt at byggja lestraríbúðir í nærumhvørvinum. Harumframt er meiningin, at Setrið fær Venjingarskúlan og tillagar hann til tørvin hjá Setrinum. Tá skuldi Fróðskaparsetrið havt ivaleyst av plássi tey næstu nógvu árini.

Sjálvandi er talan um rímiliga stórar íløgur, men Sigurð í Jákupsstovu heldur ikki, at hetta er so ræðandi, tí tað skal gerast í stigum og talan verður tí ikki um ovurstórar íløgur í byrjanini.



Fyrstu KT-verkfrøðingarnir lidnir í 2011 eftir samstarvsavtalu millum Fróðskaparsetrið og Mittuniversitetið í Svøríki – Oddfríður Petersen og Eirikur Lützen.



Á ein ella annan hátt hevur Østrøm skapt eitt tættari samband millum Fróðskaparsetrið og fjøldina. Tá hurðin á Østrøm verður latin upp, streyma fólk inn.

# Vistspeki

## – Arne Næss gav fossum og landsløgum tign



Teir djúptøknu vistfrøðingarnir vilja vera við, at náttúra og náttúrufyribrigdi hava *eginvirði*. Her verður ikki bert tosað um livandi verur, ið kunnu hugsast at hava eitt kenslulív, men eisini „deyð“ fyribrigdi sum fossar ella landsløg. Hesi hava eina *tign*, ið er óheft av nyttuvirði. Mynd: Ólavur Frederiksen.

Jógvan D. Hansen, heimspekingur, hugleiðir í greinini um norska heimspekingin Arne Næss, sum gjørdist talsmaður fyri ta *djúptøknu* vistfrøðiligu rørsluna. Arne Næss setti mark millum tær grunnu umhvørvisrørslurnar og ta *djúptøknu* vistfrøðina. Tær flestu grunnu umhvørvisrørslurnar vilja varðveita náttúruna við tí bakstøði, at gongur náttúruríkidømi til grundar, er hetta ein missur hjá menniskjanum. Tann djúptøkna vistfrøðin lærir okkum, at eisini deyð fyribrigdi sum fossar og landsløg hava eina tign, ið eru óheft av nyttuvirði. Arne Næss setur spurningin, um menniskjan er yvir náttúruni ella ein íborin partur av náttúruni.

Tá Arne Næss andaðist í januar mánaði í 2009, næstan 97 ára gamal, var tað ein eykendur profilur í norðurlendskari heimspeki, ið legði skíðstavarnar frá sær.

Gjøgnum eitt langt yrkislív kom hann at gera sína ávirkan galdandi á fleiri økjum, eisini uttan fyri tað akademiska umhvørvið.

Eftir at vera vorðin magistari í heimspeki í 1933, sum hin yngsti nakrantíð í Noreg, gekk leiðin til Wien. Har kom hann í samband við tann sonevnda Wienarkringin. Hesin var ein leyst skipaður bólkur av fyrst og fremst vísindamonnum og heimspekingum, ið høvdu nakrar felags hugsjónir og áhugamál. Í miðdeplinum stóðu spurningar um grundarlagið undir vísindunum og háttalagsspurningar. Fleiri av hesum komu seinni at vera við í menningini av tí sonevndu logisku positivismuni. Ein stevna, ið kom at hava stóra ávirkan á hann, men sum hann sum frá leið fekk eina meira kritiska áskoðan á.

Longu í 1939 gjørdist hann professari í heimspeki við lærda háskúlan í Oslo, og hann sat í hesum starvi fram til 1970. Her arbeiddi hann miðvíst við at menna lærugreinina heimspeki og tað heimspekiliga umhvørvið. Ikki minst tað, ið rópt verður filosofikum (examen philosophicum), hevði hansara tokka. Hetta var eitt skeið í heimspeki, ið øll lesandi á lærdum háskúla skuldu taka. Í hesum høpi skrivaði hann vælumtóktar lærubøkur í heimspekisøgu, skilvísi og argumentatiónsástøði. Umframt lærubøkur læt Arne Næss úr hondum bæði fakbókmentir og verk, ið meira vendu sær til almenningin, og kom hann sum frá leið at gerast ein vird rødd í almenna kjakinum.

### Hvat er sannleiki

Áhugamál hansara fevndu víða. Eins og hjá logisku positivistunum vóru sannkenningarástøðiligir og málfilosofiskir spurningar í brennideplinum. Men Arne Næss gekk nýggjar leiðir. Besta dømi um hetta er tann sonevnda *empiriska semantikkin*. Í staðin fyri greiningar við skrivaraborðið fer hann empiriskt til verka og spyr „vanligt fólk“, hvussu tey skilja hugtøk sum „sannleiki“ o.o. Úr hesum spyrjast verkini *„Thruth as Conceived by Those Who Are Not Professional Philosophers“ (1938), „Interpretation and*




**Jógvan D. Hansen,**
heimspekingur




**Arne Dekke Eide Næss**
(27. januar 1912
– 12. januar 2009)
Norskur heimspekingur, rithøvundur og fjallaklintrari. Grundlegði vistspekina og Osloskúlan. Var eisini umhvørvisstríðsmaður.

Heiðurslimur í flokkinum *De grønne.* Fekk í 2002 Nordisk Råds Natur- og Miljøpris. Í 2005 útnevndur til kommandør við stjørnu av *Den Kongelige Norske St. Olavs Orden* fyri samfelagsgagnligt avrik.

Arne Næss inni í tjaldinum á Himalaya-fjøllunum, har hann situr og lesur *Etikkina* hjá Spinoza. Myndin má sigast at vera ikonisk og er helst tann kendasta av Arne Næss.

Arne Næss var íðin fjallaklintrari og stóð eisini nógv á skíum. Hann gekk á odda tá eitt lið av klintrarum í 1950 fór upp á tann 7708 metra høga tindin Tirich Mir í Pakistan.



At friða sildastovnin ella at friða lundan, soleiðis at meira fæst burtur úr stovnunum nøkur ár seinni, er eitt sjónarmið, sum bæði myndugleikar og tær grunnu umhvørvisrørslurnar umboða. Tað snýr seg um, hvussu nógva nyttu menniskjan kann fáa úr tilfeinginum og náttúruni. Men tá stríðst verður ímóti vatnorkuútbyggingum ella fyri at friða hval, eru tað stundum bólkar, ið umboða ta djúptøknu vistfrøðina, ið ganga á odda. Her stendur eginvirði hjá lívi og náttúru ovast.

*Preciseness“ (1953)* og *„Democracy, Ideology and Objectivity“ (1956).* Hendan tilgongdin til heimspekiligar spurningar var í byrjanini ikki viðurkend av øllum, men vann so við og við fótafesti undir heitinum *Osloskúlin.*

Av øðrum, ið Arne Næss skrivar um, er *skeptisisma, Spinoza* og *ikki-harðskapsheimspekin* hjá Gandhi. Hendan seinasta skuldi koma at gerast viðkomandi eisini í verki. Hann gjørdist nevniliga alsamt meira virkin í samfelagskjakinum, ikki minst viðvíkjandi umhvørvisspurningum. Ikki so at skilja at hann ikki hevði verið uppi í samfelagsspurningum fyrr. Til dømis hevði hann verið virkin í norsku mótstøðurørsluni undir seinna heimsbardaga. Men í 1970 segði hann starvið sum professari frá sær, og fór at arbeiða við umhvørvisspurningum burturav. Hetta bar m.a. við sær, at hann var við í atgerðum, ið royndu at forða fyri inntrivum í náttúruna í sambandi við vatnorkuútbygging. Her varð tað „sivila ólýdni“ hjá Gandhi roynt í verki. Í 1974 kom *„Økologi, samfunn og livsstil“* út. Her orðaði hann sína náttúrufatan, ið nevnd verður „dýpdarøkologi“ ella „økosofi“. Síðstnevnda er sum vera man ein samanrenning av *filosofi* og *økologi.* Á føroyskum ber til at nýta orðið *vistspeki.*

## Økosofiska sjónarmiðið

Umhvørvisspurningar komu av álvara á breddan seint í sekstiárunum og í byrjanini av sjeytiárunum. Dálking av ymiskum slagi vístu seg sum ein av keðiligu avleiðingunum av nútímans ídnaðarsamfelagnum, og inntriv í náttúruna vaktu størri ans enn áður. Eisini gjørdust djóraverndarspurningar partar av kjakinum. Úr hesum viðurskiftum vuksu fram ymiskir umhvørvisfelagsskapir. Og her var tað so, at Arne Næss saman við øðrum stovnaði tað djúpdarøkologisku rørsluna.

Men hvør er so munurin á hesari rørslu og øðrum umhvørvisrørslum? Lættast er kanska at lýsa munin við at hyggja at, hvussu „djúpdarøkologarnir“ finnast at teimum „grunnu“ økologunum.

1. Tá teir „grunnu økologarnir“, og undir hesar koma tær flestu umhvørvisrørslurnar, vilja verja og varveita náttúruna, verður hetta gjørt út frá einum *nyttusjónarmiði.* Tað vil siga, at um náttúra og náttúruríkidømi ganga til grundar, er hetta ein missur hjá menniskjanum. Tað veri seg náttúra og náttúrligt margfeldi sum tilfeingi, ella sum rekreativir møguleikar. Sjónarmiðið kann kallast *utilitaristiskt,* tí tað er nyttan fyri menniskjanum, ið er tað avgerandi.
2. Tann vesturlendska náttúrufatanin, íroknað tann „grunna økologiin“ er *antroposentrisk.* Tað vil siga, at menniskjan stendur í miðdeplinum sum krúnan á skaparverkinum, og hevur rætt og kanska eisini skyldu at leggja náttúruna og hennara tilfeingi undir seg. Náttúran hevur bert virði í mun til menniskjuna.

Hesum sjónarmiðum havast dýpdarøkologarnir at. Teir vilja vera við, at náttúra og náttúrufyribrigdi hava *eginvirði.* Her verður ikki bert tosað um livandi verur so sum súgdjór v.m., ið kunnu hugsast at hava eitt kenslulív, men eisini „deyð“ fyribrigdi so sum ein fossur ella eitt landslag. Hesi hava eina *tign*, ið er óheft av nyttuvirði. Hetta merkir ikki, at einki má nertast av mannahond. Tað vildi verið heilt utopiskt. Men tað merkir, at størst møguligt fyrilit eigur at verða sýnt, havandi *eginvirði* fyri eyga.

## Menniskjan ein partur av vistskipanini

Viðvíkjandi støðu menniskjans í náttúruni, so mælir vistspekin ímóti hugsanini um, at menniskjan hevur eina serliga støðu og ein serligan rætt í heiminum. Menniskjan er ikki yvir náttúruni, men ein innfeldur partur av náttúruni. Við øðrum orðum ein partur av vistskipanini. At vit sum kanska einasti partur av hesari hava evnini til sjálvreflektión gevur okkum ikki nakran serligan rætt, men óivað eina serliga ábyrgd. Eina ábyrgd, ið vit, sætt frá einum vistspekiligum sjónarmiði, ikki hava tikið í álvara. Orsøkin til hetta er ikki neyðturviliga tørvandi intellektuellur førleiki, men vantandi kenslulig menning. Við øðrum orðum hugsa vit stuttskygt og óbúgvið.

Íblásturin til vistspekina hevur Arne Næss ikki minst frá áðurnevnda *Baruch de Spinoza* (1632-1677). Fyri Spinoza snúði tað seg um at finna tað ævigt góða. Ríkidømi, vald, heiður og æra kemur og fer, og er tað fáfongd at stremba eftir slíkum. Tað ævigt góða finnur Spinoza hinvegin í tí innliti, at heimurin er ein skipað heild. Og sannkenningin av, hvussu veruleikin av sonnum er skipaður, ger menniskjuna virkna. At vera virkin er fyri Spinoza tað sama sum at vera fríur.

Í hesum høpi er vert at gera vart við, at Spinoza eisini hevur eitt gudshugtak. Men hetta hugtakið víkir nógv frá tí jødiskt-kristna gudshugtakinum. Ikki minst hetta gjørdi, at Spinoza í síni tíð var rikin úr tí jødisku samkomuni í Amsterdam, har hann annars var ætlaður at gerast rabbinari. Tað avgerandi hugtakið er *„substansurin“.* Hesin er orsøkin til seg sjálvan, og er harumframt identiskur við alheimin. Alheimin uppfatar Spinoza sum eina skipaða heild. Hendan verður eisini nevnd *Gud* ella *Náttúran*.



Nógva íblásturin til vistspekina fekk Arne Næss frá *Baruch de Spinoza*. Fyri Spinoza snúði tað seg um at finna tað ævigt góða. Tað ævigt góða fann Spinoza í tí fatanini, at heimurin er ein skipað heild. Ásannanin av, hvussu veruleikin av sonnum er skipaður, ger menniskjuna virkna.

Áðurnevndi íblástur skal ikki skiljast sum um Arne Næss vil gera Spinoza til *vistspeking*, men ein ávísur líkleiki í hugsanarhátti finst. Hesi viðurskifti viðger Arne Næss fyrst og fremst í verkinum *„Det frie menneske – en innføring i Spinozas filosofi* (1999)“.

## Fjallaklintrarin

Umframt at vera heimspekingur, „faðirin“ at vistspekini og umhvørvisaktivistur var Arne Næss eisini ein íðin fjallaklintrari. Hann klintraði bæði heima í Noregi og úti í heimi. Ein tann kendasta ferðin mundi vera ferðin upp á tindin Tirich Mir í Pakistan í 1950. Hesin tindur er 7708 m høgur, og leiddi Arne Næss tann fyrsta bólkin, ið nakrantíð hevði verið á tindinum. Kendasta myndin av honum man vera tann, ið tikin er í Himalayafjøllunum, har hann situr og lesur *Etikkina* hjá Spinoza. Hendan má sigast at vera ikonisk. Heima í Noregi bygdi hann sær eina smáttu við Tvergastein á tí sonevnda Hallingskarvet.

Arne Næss var við lívsenda fagnaður av bæði *the establishment* og meinigmanni. Í hesum liggur sjálvsagt eitt ávíst lagnunnar speisemi, havandi í huga, at hann var ein hin fremsti kritikkarin av nútímans nýtslusamfelagnum.

# Avbjóðing at skapa samband millum vinnuligu og almennu granskingina

Á granskarasetrinum eru 600 fermetrar settir av til starvsstovur. Rúm er fyri 20 skrivstovuplássum. Hølini eru fyribils innrættað til DNA-gransking og gransking innan lív- og evnafrøði. Harumframt er ein stórur royndarkøkur, sum skal hýsa matvørugransking.

Granskarasetrið er liðugt og fleiri almennir stovnar og privat feløg fyrireika seg nú at flyta inn. Granskarasetrið er eitt úrslit av almennum og privatum samstarvi, har felags málið er at stimbra gransking sum heild og at styrkja granskingarumhvørvið í Føroyum, so tað kann geva sítt íkast til almenna og vinnuliga menning. Ítøkiligu málini hjá tí almenna og privata partinum eru ikki heilt tey somu, og tað stóra takið í framtíðini verður at skapa sambond millum vinnuligu og almennu granskingina.



Nógvir stovnar og fleiri virkir í Føroyum arbeiða við gransking og menning í smáum og ofta undir ónøktandi umstøðum. iNOVA savnar hetta saman undir einum, soleiðis at sum mest fæst burtur úr til felags frama.

Jógvan Jespersen er nevndarformaður í iNOVA.

Føroyar hava fingið sítt granskarasetur. Tað byrjaði í 2005 við ætlanini at gera stórar íløgur í eina granskingarpark á Debessartrøð. Vónirnar vóru stórar og einar 85 mió. kr. skuldu setast av. Orð vórðu sett á málini og orð vórðu somuleiðis sett á karmarnar – føroyingar tosaðu um park og granskingarlund.

Tann ætlanin varð ikki av nøkrum, og tá Vinnuframi brádliga stóð við einum tómum, soppafongdum bygningi, har millum annað Rúsdrekkasølan hevði hildið til, kom hugskotið at gera eitt granskarasetur í bygninginum. Vinnuframi kom við hugskotinum, sum Vinnumálaráðið tók undir við. Tá tann yvirskipaði granskingarpolitikkurin varð samtyktur, avgjørdi Vísindaráðið, at heitið skuldi verða Granskarasetrið iNOVA.

## Alment og vinnuligt samstarv

Granskarasetrið er úrslit av einum samstarvi millum almenna grunnin Vinnuframa og privata partafelagið iNOVA. Vinnuframi hevði eitt stovnsfæð upp á góðar 40 mió. kr., tá hugskotið kom, og grundarlagið var, at Vinnuframi umvældi bygningi og innrættaði hann til Granskarasetrið.

Í fyrstu atløgu leigar Vinnuframi granskarasetrið til iNOVA í fimm ár uttan leigukostnað. Bygnaðarliga er sostatt talan um, at iNOVA skal vera eitt rakstrarfelag hjá granskarasetrinum.

Raksturin, sum skal hvíla í sær sjálvum, verður fíggjaður við gjøldum frá vistarum. Gjøldini svara á leið til útreiðslurnar fyri ljós, hita, el, reingerð og tílíkt. Talan er sostatt um eina rættiliga bíliga hølisleigu. iNOVA hevur sett upphæddina til 4000 krónur um mánaðin umframt meirvirðisgjald fyri hvønn leigara.

Tey, sum hava skotið pengar í iNOVA, eru Fiskaaling, Framtak, Bakkafrost, Havsbrún, Tavan, TF Íløgur, Luna, Marine Harvest Faroes, Nótaskip og MBM. Hesi feløgini settu 1,3 mió. kr. í felagið.

## Málini eru at hevja granskingina

Málið hjá tí almenna í verkætlanini er at skapa eitt

iNOVA leigar hølini til vistarar ella leigarar. iNOVA veitir teimum góða tænastu og skal hava ein samskipandi leiklut millum vistararnar.

iNOVA tekur ikki í fyrsta umfari stig til granskingarverkætlanir ella at útvega tól. Hesum taka vistararnir sær av.

Tað er tó væl hugsandi, at iNOVA sum frá líður fær ein virknari leiklut í sjálvari granskingini og samskipanini millum granskingarpartar.




Arbeiðið varð gjørt í fýra byggistigum.
**1.** Hetta er sjálvt granskaraøkið.
**2.** Hesin útbygningurin er til ventilasjón, sum er alneyðug í einum slíkum bygningi.
**3.** Triðja byggistigið er at gera ymsar tillagingar í umsitingarhølunum.
**4.** Fjórða byggistigið var køkurin, sum kom afturat, tá seinastu pengarnir vórðu játtaðir.
**5.** Gamli rúsuhandilin er nú eitt rímiliga stórt høli, sum er tøkt í framtíðini og sum kann brúkast til ymiskt virksemi.
**6.** Hetta er millumbygningurin, sum bindur umsitingarpartin saman við forrúminum til køkin.

granskarasetur, sum skal stuðla upp undir almenna og vinnuliga gransking og skapa almenna og vinnuliga menning og nýskapan við at stimbra og menna sambond millum íverksetarar, granskarar, serfrøðingar og vinnuna.

Málið hjá iNOVA er at stuðla menningini av granskingarumhvørvinum í Føroyum, so tað kann geva sítt íkast til vinnuliga menning, nýskapan og økt starvsstovuvirksemi í Føroyum.

Við støði í hesum kann sigast, at ágóðin hjá vinnuni liggur í, at granskingin í Føroyum verður stimbrað.

Jógvan Jespersen, sum er nevndarformaður í iNOVA, vísir á, at í almennu og vinnuligu endamálsorðingunum eru nakrir felagsnevnarar, men av tí at tað er fyrstu ferð, at slíkt skipað samstarv verður roynt í Føroyum, kann tann stóra avbjóðingin í framtíðini gerast við at skapa sambond millum vinnuna og ta almennu granskingina. Jógvan Jespersen nevnir sum dømi, at slík samstarv millum almenna og vinnuliga gransking hevur eydnast væl í Íslandi, og at úrslitini hava verið eyðsýnd.

## Bygnaðarlig fyrireiking

Sum nevnt stóð Vinnuframi fyri at gera allar karmarnar klárar. Í fyrsta lagi var semja millum partarnar um at seta ein fíggjarkarm upp á 10 mió. kr. Hetta varð seinni hækkað til 13 mió. kr. Við virðinum á húsinum og tí, sum hoyrir til, er talan um eitt átak til frama fyri gransking á einar 30-40 mió. kr.

Beint fyri at løgtingið fór í summarfrí, samtykti tingið at niðurlaga Vinnuframagrunnin við 6,6 mió. kr. afturat. Peningurin skal brúkast til at fíggja tól til granskarasetrið.

Tað næsta var at gera eina greining av, hvussu bygningurin skuldi innrættast. Tað snúði seg eitt nú um, hvat fyri gransking skuldi vera í bygninginum og hvør útbúnaður var neyðugur. Semja var um at byrja við DNA-gransking, lív- og evnafrøði og matvørugransking.

Nevndarformaðurin í Vinnuframa, Regin Dalsgaard, sigur, at tey spurdu seg sjálvi, hvat størst tørvur var á. Niðurstøðan var, at umframt DNA og lívfrøðitøkni, var tað skilagott at leggja dent á at virðisøkja tað tilfeingið, sum vit hava.

„Matvørugransking er nýggj í Føroyum og granskarasetrið kann gerast eitt „spælipláss" hjá teimum, sum arbeiða við at menna matmentanina," heldur Regin Dalsgaard.

## Missión, visjón og virðir

Nú granskarasetrið verður tikið í brúk, verða tað teir einstøku leigararnir, sum hava ábyrgdina av virkseminum. iNOVA skal skapa karmarnar og hava ein samskipandi leiklut. iNOVA fer í fyrsta umfari ikki at keypa tól ella at taka stig til granskingarætlanir.

Missiónin er, at iNOVA við granskarasetrinum gevur íkast til eina virðisøking í føroyska samfelagnum við at hýsa granskingar-, menningar- og starvsstovuvirksemi.

„Talan er sostatt fyrst og fremst um at, at granskingin skapar virðisøking í samfelagnum, bæði alment og privat. Visjónin er, at Granskarasetrið iNOVA virkar til felags gagn, har virðisgrundarlagið er dygd, eldhugur og framtakshugur. Við framtakshuga verður hugsað um, at drívmegin skal vera at náa einum máli ella úrsliti.

Nógvir stovnar og fleiri virkir í Føroyum arbeiða við gransking og menning í smáum og ofta undir ónøktandi umstøðum. iNOVA savnar hetta saman undir einum, soleiðis at sum mest fæst burtur úr til felags frama.

Kostnaðarmikil tól, sum bara verða brúkt ein part av árinum, kunnu til dømis verða brúkt av øðrum og soleiðis gera størri gagn. Samstundis fáa vit eitt týðandi granskingarumhvørvi við at savna spjadda gransking á sama stað," sigur Jógvan Jespersen.

## Altjóða gransking

Yvirskipað hevur iNOVA nøkur mál, sum bæði snúgva seg um karmar og innihald í granskingini. Jógvan Jespersen sigur, at grundleggjandi er talan um at bjóða góðar umstøður og eitt umhvørvi, sum dregur granskarar at sær.

Felagið skal harumframt savna vitan og førleika til at fyrireika, fíggja og fremja verkætlanir og savna virkna ráðgeving á einum stað.

„Ikki minst vilja vit stremba eftir at økja gransking á altjóða stigi í Føroyum. Tað skal vera áhugavert eisini hjá útlendskum granskarum at koma til Føroyar at granska," sigur Jógvan Jespersen.

## Byrja við 10 vistarum

Partafelagið iNOVA tók við rakstrarábyrgdina av granskarasetrinum 1. juni 2013. Í fyrireikingartíðini setti iNOVA seg í samband við almennar stovnar og vinnuna til tess at kanna áhugan at gerast partur av granskarasetrinum. Sum heild hevur áhugin verið stórur.

Stovnar og feløg, sum iNOVA hevur havt samskifti við, eru m.a. Fiskaaling, Landssjúkrahúsið, Fróðskaparsetrið, Búnaðarstovan, Umhvørvisstovan, Heilsufrøðisliga Starvsstovan, Jarðfeingi, Ílegusavnið, Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Amplexa, umframt ymisk vinnufeløg.

Fyrstu sáttmálarnir verða undirskrivaðir, tá Vinnuframi handar iNOVA granskarasetrið tann 31. mai, men longu nú er greitt, at eini 10 granskarar ella granskingarætlanir byrja í summar.

Fleiri av umrøddu stovnum og privatu feløgum hava verið við í fyrireikingini og hava sostatt verið við til at ávirka tilgongdina.

Ætlanin er at skipa eina ráðgevandi nevnd, har vistararnir skulu vera umboðaðir. Á henda hátt fáa teir eisini ávirkan á menningina av Granskarasetrinum.

Tá gongd er komin á virksemið í granskarasetrinum, ætlar nevndin at fara undir at arbeiða við langtíðar strategi, fyri at seta mál fyri hvussu granskarasetrið skal mennast.

## Nýggjar starvsstovuuppgávur

Kjarnuvirksemið á granskarasetrinum verður gransking og menning og starvsstovuvirksemi, umframt undirvísing. Rúm verður eisini fyri at nýggjar starvsstovuuppgávur verða staðsettar á granskarasetrinum.

„Í tí liggur ikki, at granskarasetrið skal avlaga tær starvsstovur, sum longu eru. Ætlanin er tvørturímóti at eggja til at gera ymiskt í felag, kanska stórar verkætlanir, og at nýtt starvsstovuvirksemi kann setast í verk.

Vit fara eisini at virka fyri, at starvsstovuuppgávur, sum í dag verða gjørdar uttanlands, og sum kunnu gerast á sama dygdarstigi í Føroyum, stigvíst verða fluttar á granskarasetrið, „ sigur Jógvan Jespersen.

iNOVA og Vinnuframi stremba saman við fyritøkum og almennum stovnum í felag eftir at lyfta tað, sum eingin okkara megnar einsamallur.

iNOVA strembar eftir at gerast ein miðdepil fyri gransking í Føroyum. Men royndirnar aðrastaðni vísa, at hetta tekur tíð.





Ymisk sløg av gransking verða á granskarasetrinum og missiónin er, at iNOVA við granskarasetrinum gevur íkast til eina virðisøking í føroyska samfelagnum við at hýsa granskingar-, menningar- og starvsstovuvirksemi.

Rakstrarfelagið iNOVA varð stovnað 1. november 2011. Tíðin síðani tá hevur verið brúkt til at fyrireika virksemið, eitt nú at finna fólk, skipa felagið og seta orð á yvirskipaðu málini og at seta seg í samband við møguligar leigarar og granskarar. Seinasti parturin er so at gera sáttmálar við stovnar og fólk, sum ætla at leiga seg inn í granskarasetrið.

Hesi eru í nevndini fyri Granskarasetrið iNOVA:
- Jógvan Jespersen, stjóri í Felagnum Nótaskip, formaður
- Debes Christiansen, deildarleiðari og granskari á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni
- Durita Nielsen, góðskuleiðari hjá P/F Luna
- Sjúrður Johansen, sum hevur arbeitt saman við nevndini sum umboð fyri Vinnuframa.
- Jonhard Eysturstein, leiðari fyri biotøknitoymið hjá Fiskaaling, hevur verið fyribils stjóri, síðan felagið varð stovnað.

# Setursdagur varpaði ljós á tíggju granskingarætlanir



Tá væl er stýrt, ber til eftir bara fýra tímum at fáa innlit í 10-12 granskingarverkætlanir. Í sambandi við at Fróðskaparsetrið 20. mai í ár fylti 48 ár, fingu granskarar á setursdegnum 17. mai 15 minuttir hvør at varpa ljós á partar av tí spennandi og fjølbroyttu gransking, ið fer fram í Føroyum.

Svein-Ole Mikalsen, ph.d., professari í mýlislívfrøði á NVD, granskar í arvafrøði og arbeiðir við eini verkætlanin, ið serliga er vend móti havtilfeinginum og sum vónandi verður grundarlag fyri eini burðardyggari umsiting av fiskastovnunum.

Hjalmar Petersen, dr. phil., lektari í málfrøði á FMD, granskar í málskipanum, eitt nú tá málskipanir fara at nærkast hvørjari aðrari. Verkætlanin hevur heitið *Málamót: Margfeldi, athall, divergensur og skizoglossia.*

Qin Xin, ph.d., lektari á NVD, greiddi frá fleirtjóða kørmunum fyri evropeiska samstarvið í vísindum og tøkni, har Fróðskaðarsetrið er ein virkin viðleikari. Talan er um COST, ið er eitt smidligt og munadygt amboð til tess at samskipa alment fíggjaða gransking, har vísindafólk finna saman undir miðvísari vegleiðing.

Hans Andrias Sølvará, cand. mag., lektari á SSD, ger eina rannsókn um radikalisering av føroyska sjálvstýrisstríðnum í fyrsta triðingi av 20. øld. Politisku hugsjónirnar um aldamótið vóru samdar um, at Føroyar skuldu vera partur av danska ríkinum, men sum frá leið gjørdist retorikkurin harðari, og fleiri av sjálvstýrismonnunum gjørdust loysingarmenn. Hans Andrias roynir at greina orsøkirnar til radikaliseringina.

Eyðfinn Magnussen, cand. scient., lektari í lívfrøði á NVD, stendur á odda fyri eini verkætlan um hvussu hitabroytingar ávirka útbreiðsluna av toski kring Føroyar. Talan er um eina *Nordic Centre of Excellence* verkætlan. Nordforsk hevur sett 32 mió. kr. av í eitt fimm ára skeið til at kanna ávirkan av veðurlagsbroytingum.

Jógvan í Lon Jacobsen, dr. philos., lektari í málfrøði á FMD, og Tina Jakobsen, granskingarhjálpari á FMD, løgdu fram tilgongdina at talgilda søvnini á FMD, soleiðis at tilfarið kann gerast atkomuligt á netinum. Arbeiðið verður væntandi liðugt seinni í ár.

Kristianna Hammer, ph.d., lektari í sjúkrarøktarfrøði á SFD, legði fram eina verkætlan um kanning av kvinnum, ið nýliga hava fingið staðfest undirlívskrabba. Verkætlanin *Lýsing av vón* byggir á samrøður við fimtan kvinnur, raktar av undirlívskrabba. Kanningarhátturin skapar nýggja vitan um upplivilsi av vón og lýsir vónina hjá teimum, ið júst hava fingið staðfest undirlívskrabba. Úrslitið hevur týdning fyri kliniska sjúkrarøkt í praksis.

Erla Olsen, ph.d., námslektari á NVÍD, greiddi frá verkætlanini *Kærkomin lærdómur – men tað er ikki stuttligt!* Erla Olsen spurdi, um næmingar í framhaldsdeildini fáa nóg mikið burturúr, tá yvir 60% dámar væl at læra, men færri enn 40% halda tað vera stuttligt at ganga í skúla.

Sissal Rasmussen, ph.d. lesandi á FMD, lýsti eina ph.d.-verkætlan um málmenning hjá føroyskum børnum og hví menningin er so týdningarmikil.

Uni Árting, ph.d., adjunktur í jarðfrøði á NVD greiddi frá kanningum av basaltinum á føroyska landgrunninum, bæði *í vísindum og havrætti.*

Gransking hjá Gesti Hovgaard, ph.d., lektari á SSD, er um avbjóðingar og møguleikar, ið smásamfeløg hava í dagsins globalu broytingum. Gestur tosaði um týdningin av økta talinum av føroyingum í altjóða vinnu og um at skipa hægri lestur í smásamfeløgum.





# Frøði næstu ferð
## – TEMABLAÐ um lívfrøðiligt margfeldi og lendisnýtslu

Ført verður fram, at áseyðatalið í Føroyum skal minkast munandi, um seyðahald skal gerast burðardygt. Tilvildarlig mynd

Í miðjuni Bjørn Kalsø landsstýrismaður, sum setti ráðstevnuna. Hann vísti m.a. á, at Føroyar hava staðfest ST-sáttmálan um lívfrøðiligt margfeldi, og at tað áleggur okkum skyldur.

Komandi Frøði kemur út tíðliga í heyst og verður eitt temablað um lívfrøðiligt margfeldi og lendisnýtslu. Grundarlag fyri innihaldinum verður tað, sum kom fram á ráðstevnu í Norðurlandahúsinum 16. mai 2013 um hetta evnið.

Avgerandi spurningarnir eru, hvussu vit kunnu nýta okkara náttúru skynsamt og samstundis verja og varðveita fjølbroytta lívið við alskyns plantum og djórasløgum, har tað somuleiðis er rúmd fyri einum virknum landbúnaði, orkuframleiðslu, ferðavinnu og øðrum virksemi, sum eitt nútímans samfelag krevur.

Málið við ráðstevnuni í mai var at lýsa, hvussu lendisnýtsla ávirkar tað lívfrøðiliga margfeldi, sum er fjølbroytta samansetingin av lívi í náttúruni. Føroyar hava fyri fleiri árum síðani saman við útvið 200 øðrum londum staðfest ST-sáttmálan um lívfrøðiligt margfeldi. Tað áleggur Føroyum skyldur, men ein niðurstøða á ráðstevnuni var, at Føroyar enn ikki liva upp til ásetingarnar. Tí er neyðugt at raðfesta miðvíst arbeiði at skráseta lívfrøðiligt margfeldi sum neyðugt grundarlag undir møguligum verndarætlanum.

11 framløgur vóru á ráðstevnuni umframt pallborðskjak. Ráðstevnan varð skipað í tríggjar partar. Fyrsti partur var ein lýsing av teirri vitan, vit hava og á hvørjum økjum, granskað verður í. Annar partur snúði seg um lendisnýtslu við serligum denti á landbúnað. Í triðja parti var tikið samanum og partarnir løgdu sínar hugsanir fram um, hvørji átøk mugu gerast til tess at røkka málinum um lívfrøðiligt margfeldi.

Í komandi temablaði varpa vit ljós á tey ymsu sjónarmiðini, sum fyrilestahaldararnir komu við í sínum framløgum. Samanberingar vórðu gjørdar við støðuna í grannalondunum og eingin ivi var um, at tiltøk eru neyðug í Føroyum, um vit skulu halda skyldurnar sambært ST-sáttmálanum, soleiðis at vit tryggja burðardygga nýtslu av heimsins náttúrutilfeingi.

Eitt av sjónarmiðunum á ráðstevnuni var, at áseyðatalið kundi verið minkað niður í helvt, tí tað eru óvanliga fáir hagar, har nóg mikið av grasi er. Tað skal vera rúm fyri landbúnaðinum, men landbúnaðurin skal rekast burðardygt, um nøktandi úrslit skulu koma burturúr.

Eitt annað sjónarmið, vit fara at frætta um í komandi temablaðnum er tørvurin á dagførdari lóggávu, sum bæði veitir neyðuga rættartrygd og sum gevur neyðuga vernd av náttúruni og lívfrøðiliga margfeldinum. Trýst fer tí at verða lagt á politisku skipanina at nýtíðargera lóggávuna.

vinnuframi iNOVA



Vit ynskja **vinnuframa**
og **iNOVA** til lukku við
nýggja granskarasetrinum
við Hoyvíksvegin

BÚSETUR ELECTRIC demich